

# Umsitingarskipan til Løgtingið

## Útboðstilfar

Innlatingarfreist 7. desember 2018, kl. 12:00

# INNIHALDSYVIRLIT


1. Inngangur ... 5
2. Bakgrund ... 6
3. Orðalisti ... 7
4. Hjáskjøl og leinkjur ... 9
5. Lýsingin av veitingini ... 10
5.1. Lýsing av mannagongdum í Løgtinginum ... 10
5.1.1. Løgtingslógir [M01] ... 12
5.1.1.1. 1. viðgerð ... 12
5.1.1.2. Nevndarviðgerð ... 12
5.1.1.3. 2. viðgerð ... 12
5.1.1.4. 3. viðgerð ... 12
5.1.1.5. Staðfesting og kunngerð ... 13
5.1.2. Fíggjarlógir [M02] ... 13
5.1.3. Ríkislógir [M03] ... 13
5.1.4. Uppskot til samtyktar [M04] ... 13
5.1.5. Skrivligir fyrispurningar [M05] ... 13
5.1.6. Munnligir fyrispurningar [M06] ... 13
5.1.7. §52a spurningar [M07] ... 13
5.1.8. Ófráboðaðir spurningar [M08] ... 14
5.1.9. Frágreiðingar [M09] ... 14
5.1.10. Serligar fráboðanir [M10] ... 14
5.2. Lýsing av verandi umsitingarskipan (UMS) ... 15
5.2.1.1. Innritan ... 17
5.2.1.2. Stovna og umsit tingmál ... 17
5.2.1.3. Tilknýti til skjalasavn og versiónsstýring ... 20
5.2.1.4. Dagsskrá og gerðabók ... 21
5.2.1.5. Nevndarfundir ... 25
5.2.1.6. Umsit nevndarmál ... 28
5.2.1.7. Dagsskráin (almennur kalendari) ... 28
5.2.1.8. Brúkaraumsiting ... 29
5.2.2. Heimasíða (CMS) - gjøgnumgongd ... 31
5.2.2.1. Dagsskráin ... 32
5.2.2.2. Nevndarfundir ... 32
5.2.2.3. Árskalendari (1) ... 33
5.2.2.4. Árskalendari (2) ... 33
5.2.2.5. Vikuætlan tingsins ... 34
5.2.2.6. Tingmál ... 34

5.2.2.6.1. Tinglisti (6) ... 35
5.2.2.7. Gerðabókin ... 36
5.2.2.8. Tingnevndir ... 37
5.2.2.9. Tingmenn ... 37
5.2.2.10. Umsiting ... 38
5.2.2.11. Nýtt ... 39
5.2.2.12. Leiting ... 39
5.2.2.13. Løgtingstíðindi ... 40
5.2.2.14. Annað tilfar ... 41
5.2.3. Databygnaður ... 41
6. Krøv og ynskir til nýggja loysn ... 42
6.1. Tingmál sum grundarsteinur ... 42
6.1.1. Samvirkan millum slag av tingmáli og málsviðgerðarstig ... 45
6.2. Ein skipan – fleiri gluggar ... 46
6.3. FÓLK - Brúkaraumsiting ... 47
6.4. Meta- og upprunadata ... 48
6.5. Framkomin leitiskipan ... 48
6.6. Miðsavnan av kunning ... 49
6.7. Krøv til brúkarauppliving (UX og UI) ... 50
6.8. Krøv til tøkniliga veiting ... 50
6.8.1. Hýsing og rakstrarumhvørvi ... 50
6.8.2. Stýriskipan ... 51
6.8.3. Krav til brúkarastýring ... 51
6.8.4. Trygdarkrøv ... 51
6.8.5. Atlit til persónsupplýsingarlógina/GDPR ... 52
6.8.6. Kervisumsiting ... 52
6.8.7. Viðlíkahald og skjalfesting ... 52
6.8.8. Backup ... 52
6.9. Almenn krøv til veitaran ... 53
6.9.1. Kjølfesti í Føroyum ... 53
6.9.2. Organisatión og førleikar ... 53
6.9.3. Verkætlanarleiðsla ... 53
6.9.4. Fíggjarviðurskifti ... 54
6.10. Skipan av verkætlan ... 54
6.10.1. Stýrisbólkur ... 54
6.10.2. Tíðarætlan ... 54
6.10.3. Menningartilgongd ... 54
6.10.4. Menningarumhvørvi ... 55

6.10.5. Royndarkoyring og verkseting ... 55
6.10.6. Undirvísing ... 55
7. Tilboð frá veitara ... 56
7.1. Krav til tilboðið ... 56
7.2. Samlað lýsing av veiting ... 56
7.3. Kravlisti ... 56
7.4. Framløgufundur ... 56
8. Útboðstilgongd ... 57
8.1.1. Tíðarætlan fyri útbjóðing ... 57
8.1.1.1. Almannakunngerð av útboði ... 57
8.1.1.2. Skrivligir spurningar ... 57
8.1.1.3. Fráboðan um luttøku sum tilboðsgevi ... 57
8.1.1.4. Spurnafundur ... 58
8.1.1.5. Innlating av tilboði ... 58
8.1.1.5.1. Framløga av tilboði ... 58
8.1.2. Viðgerð og meting av tilboðum ... 58
8.1.2.1. Vegleiðing til vektarstig ... 59
8.1.2.1.1. Prísur (50%) ... 59
8.1.2.1.2. Góðska (45%) ... 59
8.1.2.1.3. Verkætlan (5%) ... 60
8.1.2.1.4. Samlað vektarstig ... 60
8.1.3. Fráboðan um avgerð ... 60
8.1.4. Víðari tilgongd við veitara ... 61
9. Serlig viðurskifti ... 62
9.1. Flytan av tilfari frá verandi umsitingarskipan (Migrering) ... 62
9.2. Menning av nýggjum markamóti til AV – skipan í tingsalinum ... 62

# 1. Inngangur

Løgtingsumsitingin vil við hesum skjali alment bjóða út arbeiðið, at menna nýggja umsitingarskipan og heimasíðu til stovnin. Stovnurin er umsitingarligi parturin av Løgtinginum og hevur til høvuðsendamál at tryggja, at alt virksemi í Løgtinginum og í umsitingini er í tráð við við gjaldandi Stýrisskipanarlóg og Tingskipanina. Harumframt eisini at hava um hendi uppgávur fyri løgtingsformannin, formansskapin og løgtingsmenn. Verandi umsitingarskipan og heimasíða er, við undantaki av ymiskum tillagingum, frá 2008.

Útboðið verður kunngjørt á almenna keypsportalinum, www.keypsportal.fo, **týsdagin 30. oktober 2018, kl. 13:00**. Teir veitarar, ið ynskja at lata inn tilboð, skulu boða frá hesum í seinasta lagi **fríggjadagin 9. november 2018, kl. 13:00**. Spurningar í sambandi við útboðið kunnu sendast til til johnhardk@logting.fo fram til **fríggjadagin 9. november 2018, kl. 13:00**. Niðanfyri sæst tíðarætlan fyri útboðstilgongdina, sí annars kapittul 8:

| Dagur | Dato | Kl. | Evni |
|---|---|---|---|
| Týsdagin | 30-10-2018 | | Útboðið almannakunngjørt á keypsportalinum |
| Fríggjadagin | 09-11-2018 | 13:00 | Skrivligir spurningar móttiknir og fráboðan um luttøku sum tilboðsgevi |
| Mánadagin | 12-11-2018 | 10:00 | Spurnafundur verður hildin og kravlisti útflýggjaður |
| Fríggjadagin | 07-12-2018 | 12:00 | Tilboð latast inn |
| Týsdagin | 11-12-2018 | Nærri avtala | Framløgufundur av tilboð og loysn |
| Mikudagin | 19-12-2018 | 12:00 | Fráboðan um avgerð |

*Talva 1-1 Tíðarætlan fyri útboði*

Vegna Løgtingsumsitingina



**Johnhard Klettheyggj**

*Løgtingsstjóri*

## 2. Bakgrund

Løgtingsskrivstovan hevur sett sær sum mál at fáa dagført verandi umsitingarskipan, ið saman við heimasíðuni (www.logting.fo) og øðrum hjáskipanum, verður nýtt til stóran part av umsitingarligu málsviðgerðini í Løgtinginum og at samskipa og kunna allar áhugahavarar í hesum sambandi.

Avgerandi fyri eina nýggja loysn er, at:

- at Løgtingið fær eina dagførda og framkomna heimasíðu- og umsitingarskipan, ið er í tráð við innanhýsis mannagongdir.
- at nýggja loysnin verður eitt framstig sum effektivt amboð í gerandisdegnum hjá starvsfólki í umsitingini, løgtingsmonnum og øðrum innan- og uttanhýsis áhugahavarum.
- at nýggja loysnin betrar støðið viðvíkjandi kunning, samskifti og brúkaratænastu hjá øllum áhugahavarum.
- at menningartøkni, tøkniligi bygnaðurin og visuella sniðgevingin av nýggju loysnini stendur mát við nútímans krøv á líknandi loysnum.
- at skipanin hevur eina framkomna leitifunku, sum ger tað lætt hjá øllum brúkarum at fáa upplýsingar úr skipanini.
- at skikkaður veitari kann veita eina nýggja loysn í tøttum samstarvi við starvsfólkum í Løgtingsumsitingini, so stovnurin fær eina framkomna og vælvirkandi skipan.

# 3. Orðalisti

Fylgjandi verða hesar orðalýsingar og styttingar nýttar:

| Lýsing | Útgreining |
|---|---|
| **CMS** | Content Management System.  Heimasíðuskipan sum partur av samlaðu loysnini og sum sæst á www.logting.fo. |
| **FÓLK** | Heiti fyri brúkarastýring av atgongd og rættindum hjá brúkarunum í verandi og komandi skipan. |
| **GDPR** | General Data Protection Regulation (GDPR) er fyriskipan um dátuviðgerð innan ES. Les meira á https://eugdpr.org/ |
| **GEBS** | Gebs Software Solution. Veitari av verandi UMS - skipan og heimasíðu (www.logting.fo), http://gebsreporting.com/ |
| **Gluggi** | Brúkaramarkamót ella “view”, sum eru skraddaraseymað til ein ávísan bólk av brúkarum, so sum starvsfólk, tingmenn og almenningur. |
| **Kundi/n** | Løgtingsumsitingin, ið vegna Løgtingið er eigari av skipanini, við tilvísing til Johnhard Klettheyggj, Løgtingsstjóra. |
| **LEITA** | Tittul fyri framkomna leitiskipan, sum verður lýst í kravfesting. |
| **Listi/Datalisti** | Í tann mun at “listi” verður nevnt í lýsingini,  kann talan vera um vanligar listar ella talva í dátugrunni. |
| **LU** | Løgtingsumsitingin. Øll starvsfólk, ið eru knýtt at umsitingini. |
| **Mál** | Málsviðgerð av málum, ið kunnu enda sum tingmál. Eitthvørt evni sum løgtingsumsitingin skrásetur sum innkomin mál, ið møguliga endar við at gerast eitt tingmál, tá ið hetta er búgvið til tess. Um málið ikki endar sum løgtingsmál verður hetta skjalfest og kann takast fram aftur seinni eftir ynski frá tingmanni. Starvsfólk málsviðgera sakir manuelt við hjálp av fíldrevi, teldupostskipan og øðrum hjáskipanum. Í løtuni fer málsviðgerðin av innkomnum málum fram uttanfyri umsitingarskipanina (UMS). |
| **Sýning** | Yvirlit, har data verður víst við ymiskum teigum, sum eru valdur útfrá ásettum filtri og/ella sortering. |
| **Tíðarstempul** | Tíðarstempul (timestamp) er partur av metadata um ymiskar hendingar (event) ella leiklutir hjá persónum, sum eru skrásettir í skipanini, so tað til dømis ber til ber líta afturá og síggja, hvør sat í hvørjari nevnd í einum ávísum tíðarskeiði. Hetta skal vera ein aðalregla í einari nýggjari loysn. |
| **Tilfarsíða/undirsíða** | Síður sum koma undir heitið “Content – page” ella bara “page”. Vanlig tilfarsíða uttan serligar eginleikar annað enn teir, sum arvast frá yvirskipaðu uppsetingini í skipanini. |
| **TING** | Skipan, ið virkar í Tingsalinum og sum í dag er veitt av Audio Visuelt Centrum |

| | |
|---|---|
| | A/S . Veitari av serútgerð í Løgtingssalinum viðvíkjandi ljóð, sjónbanda-stroyming og atkvøðugreiðslu, sí https://www.AVC.dk/ |
| **Tingár** | Eitt tingár er galdandi frá 29. juli til 28. juli árið eftir. Tingárið 2018 er tí frá 29. juli 2018 til 28. juli 2019. Alt løgtingsarbeiðið er knýtt at einum ávísum tingári í sambandi við skráseting í skipanum. |
| **Tingmál** | Tá eitt mál er búgvið at leggja fram fyri løgtingið, verður hetta skrásett sum løgtingsmál við tilhoyrandi skjølum, ið vera latin tinginum í sambandi við framløgu. |
| **Tingmenn** | Tingmenn er felagsheitið fyri bæði kvinnur og menn, ið sita ella hava sitið á tingi. |
| **Tingnevnd** | Løgtingsnevndir og tess limir, ið eisini kunnu hava limir, ið ikki eru tingmenn. |
| **UMS** | Umsitingarskipan Løgtingsins. |
| **Veitari/n** | Veitari ella tilboðsgevi, herundir eisini møguligir samstarvspartar ella 3. partsveitarar, sum eru partar av veitingini. |
| **Viðgerðarstig** | Ásetir hvar í tingviðgerðini eitt mál liggur. Hetta kann kann til dømis vera: framløga, 1., 2. ella 3. viðgerð, nevndarviðgerð, atkvøðugreiðsla ella aðalorðaskifti. |

*Talva 3-1 Orðalisti*

# 4. Hjáskjøl og leinkjur

Fylgjandi hjáskjøl eru partur av útboðstilfarinum og vera víst til við leinkju.

| Skjal | Heiti | Tilvísing | Slag |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Hjáskjal 1** | Tingskipan Løgtingsins | Leinkja | Logir.fo |
| **Hjáskjal 2** | Løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 | Leinkja | Logir.fo |
| **Hjáskjal 3** | Yvirlit av samansettum talvum í Mysql - datagrunni hjá Løgtinginum. Datagrunnurin liggur á servara á Elektron umvegis KT Landsins. | Hjálagt skjal | PDF – fíla |
| **Hjáskjal 4** | Tingmál. Yvirlits- og eginleikamynd av Tingmálum | Hjálagt skjal | PDF – fíla |
| **Hjáskjal 5** | Prísur og gjaldsavtala | Hjálagt skjal | Word - fíla |

*Talva 4-1 Hjáskjøl*

# 5. Lýsingin av veitingini

Fyri at geva ein fatan av, hvat samlaða veitingin fevnir um og hvørji virkisøkið nýggja loysn skal knýtast til, verður í 5.1. gjørd ein lýsing av teimum mannagongdum, ið eru galdandi í økinum. Talan er her um at umsita og handfara øll skjøl, tilfar og kunning í sambandi við fyrireiking og málsviðgerð av tingmálum, sum verða borin í Løgtingið. Undir 5.2. verður eftirfylgjandi gjørd ein lýsing av, hvussu løgtingsumsitingin (hereftir eisini sum LU) umsitur hesar mannagongdir við hjálp av talgildum mannagongdum og funkum í skipanini, og hvussu skipanin í mun til, hvat málsviðgerðarstig tingmálið er á, gevur atgongd til nevndu skjøl, tilfar og kunning. Í lýsingini verður partvíst komið inn á evni, har skipanin annaðhvørt hevur manglar, ella har nýhugsan og dagførd tøkni kann loysa hetta smidligari. Í øðrum lagi verða manglar og ynski um nýhugsan at gera umsitingina av tingmálum so effektiva sum til ber lýst í kapittul 6 og í kravlistanum, ið verður latin á spurnafundi. Her verða øll krøv og vánir til eina nýggja loysn formfest í samlaðari kravfesting, har til ber hjá tilboðsveitara at útgreina, hvussu hesi verða rokkin við tí loysn, ið veitarin bjóðar fram.




*Strikumynd 5-1 Yvirlitsmynd av verandi skipan*

## 5.1. Lýsing av mannagongdum í Løgtinginum

Løgtingsumsitingin hevur, umframt aðrar umsitingarligar uppgávur, fyrst og fremst til uppgávu at umsita alt arbeiði sum fer fram í Løgtinginum og í tráð við galdandi tingskipan. Umsitingin skal tí trygga, at alt fer rætt fram, og at tingmenn, landsstýrisfólk og onnur sum eru partar av løgtingsarbeiðinum, hava atgongd til viðkomandi tilfar og kunning, og at umstøðurnar at útinna politiska arbeiðið eru á besta hátt innanfyri givnar rammur.

Treytin fyri at eitt mál kann koma í tingið er, at málið er búgvið at viðgera sum tingmál. Hetta tryggjar LU við at eftirkanna øll innkomin mál bæði formliga, løgfrøðiliga og málsliga, og um neyðugt, hjálpa til við at viðkomandi mál fáa neyðugu góðskuna til at verða løgd fram sum tingmál.

Alt eftir hvat slag av máli talan er um, er mannagongdin ymisk frá tí, at eitt mál er góðkent og til tað er avgreitt sum tingmál. Í tingskipanini er tilskilað, hvussu ymisku tingmálini skulu viðgerast, og taka mannagongdirnar (M) útgangsstøði í hesum. Fylgjandi verður hetta lýst í hesi raðfesting:

- Løgtingslógir [M01]
- Fíggjarlógir [M02]
- Ríkislógir [M03]
- Uppskot til samtyktar [M04]
- Skrivligir fyrispurningar [M05] §53
- Munnligir fyrispurningar [M06] §52
- §52a spurningar [M07]
- Ófráboðaðir spurningar [M08] §52
- Frágreiðingar [M09]
- Serligar fráboðanir [M10]




*Strikumynd 5.1-1 Strikumynd við renslinum í málsviðgerðini av løgtingslóg*

Í strikumyndini sæst rensli í málsviðgerðini av tingmáli, sum her er eitt uppskot til løgtingslóg. Í **talvu 6.1.1-1** á síðu 44 er eitt fullfíggjað yvirlit av málsviðgerðarstigum fyri ymisku tingmálini (M 1 til M10) saman við tíðarfreistum, ið kunnu gera seg galdandi fyri ymisku tingmálini.

### 5.1.1. Løgtingslógir [M01]

Uppskot til løgtingslóg skal fyri á fýra ymiskum tingfundum. Harumframt fær málið nevndarviðgerð í løgtings nevnd. Løgtingslógaruppskot er framlagt, tá løgtingsformaðurin á tingfundi boðar frá tí av tingsins røðarapalli. Eintak av uppskotinum verður latið hvørjum tingmanni talgilt á heimasíðuni í seinasta lagi sama dag. Á framløgufundinum verður málið ikki umrøtt, og kann heldur ikki beinast í nevnd.

#### 5.1.1.1. 1. viðgerð

Uppskot kann fáa 1. viðgerð 2. yrkadagin eftir framløgu. Við 1. viðgerð verður uppskotið umrøtt í síni heild. Broytingaruppskot kunnu verða fráboðað og umrødd.

#### 5.1.1.2. Nevndarviðgerð

Eftir 1. viðgerð fáa málini vanliga nevndarviðgerð. Tað er løgtingsformaðurin, ið ger av, um mál skal beinast í nevnd, og hvørja nevnd tað skal í. Nevndin skrivar tinginum álit, og samd nevnd, meirilutin og minnilutar í nevndini kunnu seta fram broytingaruppskot. Vanliga fáa mál bara nevndarviðgerð millum 1. og 2. viðgerð. Tingið kann tó á øðrum viðgerðarstigi samtykkja at beina mál aftur í nevnd. Undir nevndarviðgerðini granska nevndarlimirnir uppskotið gjøllari og fáa til vega eyka upplýsingar frá almennum og privatum, og í summum førum kallar nevndin eisini fólk inn á fund at fáa tey at siga sína hugsan um uppskotið.

#### 5.1.1.3. 2. viðgerð

2. viðgerð kann vera 3. yrkadagin eftir, at 1. viðgerð endaði, tó ikki fyrr enn 2. dagin eftir, at møguligt nevndarálit er lagt fram. Tingmaður kann skrivliga seta fram broytingaruppskot, men skal tað vera gjørt, áðrenn orðaskiftið við 2. viðgerð er byrjað. Nevndin, meirilutin ella minniluti kunnu eisini skrivliga seta fram broytingaruppskot, eftir at 2. viðgerð er byrjað, men áðrenn orðaskiftið er endað. 2. viðgerð endar við atkvøðugreiðslu. Fellur uppskotið, steðgar viðgerðin her.

#### 5.1.1.4. 3. viðgerð

3. viðgerð kann vera 2. yrkadagin eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at møguligt nevndarálit er lagt fram. 4 tingmenn kunnu í felag skrivliga seta fram broytingaruppskot, og um málið er beint í nevnd við 2. ella 3. viðgerð, so kann nevnd, meiriluti ella minniluti í nevndini skrivliga seta fram broytingaruppskot. Broytingaruppskot kann leggjast fram við 3. viðgerð, áðrenn orðaskiftið byrjar. Við 3. viðgerð verða broytingaruppskot og tær greinar, broytingaruppskotið viðvíkir, umrødd fyrst og koma fyrst til atkvøðugreiðslu. Eftir hetta verður endalig atkvøðugreiðsla, tá tingið samtykkir ella fellir uppskotið.

#### 5.1.1.5. Staðfesting og kunngerð

Sjálvt um Løgtingið hevur samtykt lógaruppskot, so er tað ikki bindandi fyri borgaran. Tað gerst tað ikki, fyrr enn løgmaður hevur staðfest uppskotið sum løgtingslóg og kunngjørt tað í Kunngerðablaðnum.

### 5.1.2. Fíggjarlógir [M02]

Verður viðgjørt eins og løgtingslógir og kann liggja 2 mánaðir í nevnd. Fíggjarnevndin kann senda fíggjarlógaruppskot til aðrar nevndir til ummælis.

### 5.1.3. Ríkislógir [M03]

Uppskot til ríkislógartilmæli, har tað er ynski hjá løgtinginum at fáa danska Fólkatingið at viðgera og seta í gildið.

Uppskot til ríkislógartilmæli verða viðgjørd á sama hátt sum uppskot til løgtingslógir. Einasti munur er, at endaliga úrslitið verður ikki kunngjørt alment, men harafturímóti fráboðað ríkismyndugleikunum av løgmanni.

### 5.1.4. Uppskot til samtyktar [M04]

Hesi mál verða viðgjørd sum uppskot til løgtingslógir. Tó enda hesi mál eftir atkvøðugreiðsluna við 2. viðgerð og skulu ikki staðfestast og kunngerast av løgmanni.

### 5.1.5. Skrivligir fyrispurningar [M05]

Tað, sum eyðkennir hesi tingmál, er, at Løgtingið onga niðurstøðu ger. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt, eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Við hesum viðgerðarhættum kann løgtingsmaður fáa allar tær upplýsingar, hann hevur fyri neyðini, frá løgmanni, landsstýrismanni ella ríkisumboðsmanninum, og út frá hesum gera sær sínar politisku niðurstøður um, hvat ið hann ætlar.

### 5.1.6. Munnligir fyrispurningar [M06]

Tað, sum eyðkennir hesi tingmál, er, at Løgtingið onga niðurstøðu ger. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt, eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Við hesum viðgerðarhættum kann løgtingsmaður fáa allar tær upplýsingar, hann hevur fyri neyðini, frá løgmanni ella landsstýrismanni, og út frá hesum gera sær sínar politisku niðurstøður um, hvat ið hann ætlar.

### 5.1.7. §52a spurningar [M07]

Tingmenn kunnu seta løgmanni og landsstýrismonnum skrivligar spurningar, sum ikki eru settir á annan hátt, um almenn viðurskifti. Spurningar kunnu ikki setast millum jóansøku og ólavsøku, eftir at val er skrivað út, ella eftir at landsstýrið hevur lagt frá sær. Spurningurin verður umvegis umsiting tingsins latin formanninum, sum sendir spurningin til løgmann

ella avvarðandi landsstýrismann, ið skal svara í seinasta lagi 10 yrkadagar eftir, at spurningurin er latin inn. Løgmaður og landsstýrismenn kunnu við skrivligari grundgeving boða frá, at spurningur ikki verður svaraður.

### 5.1.8. Ófráboðaðir spurningar [M08]

Tað, sum eyðkennir hesi tingmál, er, at Løgtingið onga niðurstøðu ger. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt, eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Við hesum viðgerðarhættum kann løgtingsmaður fáa allar tær upplýsingar, hann hevur fyri neyðini, frá løgmanni ella landsstýrismanni, og út frá hesum gera sær sínar politisku niðurstøður um, hvat ið hann ætlar.

### 5.1.9. Frágreiðingar [M09]

Tað, sum eyðkennir hesi tingmál, er, at Løgtingið onga niðurstøðu ger. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt, eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Við hesum viðgerðarháttum kann løgtingsmaður fáa allar tær upplýsingar, hann hevur fyri neyðini, frá løgmanni ella landsstýrismanni, og út frá hesum gera sær sínar politisku niðurstøður um, hvat ið hann ætlar.

### 5.1.10. Serligar fráboðanir [M10]

Til dømis fráboðan frá løgmanni um nýval ella at landsstýrismaður verður útskiftur.

## 5.2. Lýsing av verandi umsitingarskipan (UMS)

Løgtingið og tess umsiting nýtir í dag eina skipan, ið upprunaliga var ment í 2008, har smærri tillagingar síðani eru gjørdar. Skipanin verður her umrødd sum **UMS** (Umsitingarskipan Løgtingsins) og knýtir seg til arbeiðið, sum fer fram í umsitingini í sambandi við málsviðgerð av øllum løgtingsmálum. Skipanin tekur við, tá tingmál eru búgvin at vera borðin í Løgtingið til viðgerðar í tráð við áður lýstu mannagongdir (M1 – M10). UMS er at rokna sum sjálv høvuðsskipanin í arbeiðinum, men er eisini knýtt at øðrum hjáskipanum. Skipan skal í hesum føri skiljast sum bæði telduskipanir og manuellar mannagongdir í sambandi við alt tingarbeiðið. Skipanir og mannagongdir í sambandi við annað umsitingarligt arbeiði so sum fíggjarstýring, starvsfólkamál o.s.fr. er ikki partur av hesum.




*Strikumynd 5.2-1 Yvirlitsmynd av høvuðspørtum í skipanini – sæð út frá einum logiskum býti*

- **Málsviðgerð**. Eitthvørt evni sum løgtingsumsitingin skrásetur sum innkomin mál, ið møguliga endar við at gerast eitt tingmál, um hetta líkur ásett krøv fyri at kunna verða lagt fyri tingið. Talan er tó ikki um journalisering av politiskum málum. Um málið ikki endar sum løgtingsmál verður tað skjalfest, tí tað møguliga seinni verður tikið uppaftur av tingmanna sum mál/tingmál. Í løtuni fer innleiðandi málsviðgerðin fram uttanfyri umsitingarskipanina (UMS), har starvsfólk í LU manuelt viðgera innkomin mál við hjálp frá fíldrevum, teldupostskipan og øðrum hjáskipanum.

- **UMS**. Høvuðsskipanin umsitur málsviðgerðina av tingmálum og tryggjar, at viðkomandi skjøl, tilfar og kunning er atkomilig til viðkomandi tingmenn og onnur í annaðhvørt í tingviðgerðini ella nevndarviðgerðini.

- **CMS**. Heimasíðan www.logting.fo, har alt alment tilfar er tøkt. Eisini er ein eldri útgáva av heimasíðuni tøk á www.logting.elektron.fo, har til ber at leita eftir eldri tilfari. Hóast tað í hesi lýsing verður gjørdur munur millum UMS og CMS, so er tað tøkniliga sama skipan og ikki tvær ymiskar. Meira um hetta seinni.

- **USER**. Eisini nevnt sum FÓLK. Brúkarastýringin er ein serskildur partur av skipanini og er ikki beinleiðis knýtt aðrari miðsavnaðari brúkarastýring, t.d. Active Directory. Tað er ikki neyðugt hjá brúkaranum at vera ritaður inn á nanvaøkið (domain) hjá Løgtinginum umvegis AD hjá KT Landsins fyri at fáa atgongd til skipanina. Skipanin kann røkkast uttanfyri netið hjá KT Landsins við einum vanligum kaga/browsara.

- **TING.** Í tingsalinum verður nýtt ein sokallað AV – skipan, ið ambætar alla útgerð og ger tað møguligt hjá tingformanni og tingskrivara at stýra orðaskiftinum á tingfundum. Skipanin stýrir sjónbanda- og ljóðupptøku, talutíð og atkvøðugreiðslum og skrásetir og goymir hetta til eftirviðgerð í UMS. Sjónbandastroymingin fer tó beinleiðis víðari til Kringvarp Føroya og er ikki beinleiðis partur av UMS í dag. Eisini lesur AV skipanin dagsskránna inn, og verður henda síðani nýtt sum fundarskrá.
  Ljóðupptøkan frá tingfundinum verður lisin inn á fílservaran í UMS, har hon av verandi veitara verður eftirviðgjørd og knýtt at hvørjum tingmáli sær og tilhoyrandi røðaralista, so til ber at lurta eftir orðaskiftinum á heimasíðuni. LU knýtir síðani eina leinkju til viðkomandi tingmál og undir tilsvarandi viðgerðarstig. Dømi um hetta kann síggjast undir "Orðaskifti" her (Leinkja til www.logting.fo).
  Atkvøðugreiðslur vera eisini lisnar inn á fílservaran, har tær verða stovnaðar sum PDF – fíla. Eisini her knýtir LU hetta til viðkomandi tingmál og viðgerðarstig.

- **NEVND**. Tingnevndir eru partar av málsviðgerðini av tingmálum, men sum á ymsan átt virka sum sjálvstøðugar eindir innan løgtingsarbeiðið. Nevndararbeiðið er í útgangsstøði í trúnaði, har fastar mannagongdir eru fyri, nær kunning og tilfar frá nevndararbeiðinum kann latast øðrum ella er alment atkomuligt. Harumframt kunnu ávísar nevndir vera umboðaðar av fólki, ið annars ikki er partur av tingmanningini, og sum tí ikki hava atgongd til annað enn tað, sum er tøkt í nevndini ella er alment.

- **TINGMENN**. Teldlar (Ipad) geva løgtingsmonnum atgongd til viðkomandi skjøl og kunning í sambandi við málsviðgerð í tinginum. Til ber at síggja dagsskránna fyri ting- og nevndarfundir og fáa atgongd til viðkomandi skjøl, eins og tingmenn kunnu gera upprit (notat) til hvørt tingmál. Hesi upprit eru tó bert tøk á teldlinum og kunnu ikki knýtast beinleiðis til UMS.

Fyri at geva eina fatan av, hvussu skipanin undirbyggir málsviðgerðina, og hvussu ein nýggj loysn kann endurskapa og/ella koma við nýhugsan um, hvussu hetta kann umsitast í talgildum formi, verður skipanin lýst í stuttum við skermmyndum og

stuttum frágreiðingum. Í lýsingini verður sum áður nevnt komið inn á evni, har skipanin annaðhvørt hevur manglar, ella har nýhugsan og dagførd tøkni kann loysa hetta smidligari.

#### 5.2.1.1. Innritan

Skipanin hevur sína egnu brúkarastýring, sum ikki beinleiðis er knýtt at Active Directory ella aðrari miðsavnaðari brúkarastýring.

#### 5.2.1.2. Stovna og umsit tingmál




*Skermmynd 5.2.1.2-1 Umsit mál- yvirlitsmynd av málum fyri verandi tingár*

Her kann LU stovna mál, broyta mál og sletta mál. Í vinstra teigi kann veljast, um mál skal skrásetast, ella skrásett mál skal tillagast.

Útgangsstøðið í umsitingini av tingmálum er fyrst og fremst gjaldandi tingár, ið verður valt við "Archive". Her er yvirlit yvir øll tingmál, sum eru viðgjørd ella skulu viðgerast.

Í teiginum "Vel slag av máli..." kann veljast, hvat slag av málum talan er um. Hesi eru:

- Lógaruppskot
- Fíggjarlógaruppskot
- Ríkislógartilmæli
- Uppskot til samtyktar
- Skrivligur fyrispurningur

- Munnligur fyrispurningur
- Ófráboðaðir fyrispurningur
- Spurningur §52a
- Frágreiðing




*Skermmynd 5.2.1.2-2 Broyt verandi mál. Sama mynd til at stovna og broyta mál*

Í hesum yvirliti verður mál stovna ella broytt í skipanini.

**Stovnan:** Leypandi nummur + tingár + yvirskrift, ið lýsir málið í stuttum

**Atknýtt skjøl**: Yvirlit yvir øll skjøl, ljóðfílur og slóðir, sum eru viðkomandi fyri málið. Ljóðfílur eru upptøkur frá orðaskifti í tinginum um viðkomandi mál í mun til, hvørja viðgerð talan er um. Við stovnan eru ljóðfílur og slóðir ikki til.

**Atknýtt skjøl (kassin til høgru)**: Yvirlit yvir ítøkilig skjøl, sum júst nú eru í málinum, og sum eru viðkomandi í viðgerðini.

**Yvirlit niðanfyri:** Yvirlit hvar í arbeiðsgongdini (arbeiðsstig) málið er komið til. Sum sæst á næstu myndum, verður sama mannagongd viðvíkjandi knýttum skjølum, ljóðfílum og leinkjum nýtt gjøgnum alla málsviðgerðina í tinginum og í nevndum.

Møgulig málsviðgerðarstig sum skipanin kann skráseta her, eru:

1. Skrásett nýtt tingmál (Klárt til framløgu)
2. 1. viðgerð
3. 2. viðgerð
4. 3. viðgerð
5. 1. nevndarviðgerð (Committee handling 1)

6. 2. nevndarviðgerð (Committee handling 1), ið er nýggj nevndarviðgerð í sambandi við 2. og 3. viðgerð av tingmáli.
7. Enda málið. Málið er avgreitt við tí teksti og skjølum, sum er samtykt ella fráboðað.




*Skermmynd 5.2.1.2-3 Stovnan ella broyting av skjølum undir viðgerð í ávísari nevnd*




*Skermmynd 5.2.1.2-4 Innles skjøl til nevndarviðgerð*

Í hesi myndini verður eitt skjal atknýtt, umframt at yvirskipaðir upplýsingar (metadata) verða knýttar til málið og viðkomandi skjøl.

Metadata

**Heiti:** Skal útfyllast. Skal lýsa sum eina yvirskrift, hvat skjalið er um.

**Til/frá:** Hvør er móttakari (t.d. nevnd), og hvør er avsendari (t.d. uppskotsstillarin)

**Viðheft skjal:** Viðheft skjal

**Skjal er alment:** Ja/nei við flugubeini. Um ja, er skjalið alment og kann eftir góðkenning "Góðkent" síggjast á heimasíðuni, sum partur av atkomuligt fyri nevndarlimum.

**Dagfesting:** Dagfesting nær skjalið er stovnað (datoveljari)

**Latið nevndini:** Nær skjalið verður latið nevndini til viðgerðar (datoveljari)

**Add:** Møguleiki at leggja eitt nýggj skjal afturat, og skrásetingin verður endurtikin.

**Innlisin skjøl:** Her síggjast øll skjøl, sum eru lisin inn frammanundan, og ber til at rætta verandi skjøl og metadata. Tá eitt skjal er góðkent við "Góðkent" í høgra bredda, er skjalið tøkt í nevndini, og um skjalið er alment, er tað so eisini atkomuligt á heimasíðuni.

#### 5.2.1.3. Tilknýti til skjalasavn og versiónsstýring

Øll skjøl, sum verða lisin inn í UMS, liggja í dag fyrst og fremst á felags fílservara hjá LU. Tað er her umráðandi at skilja, at øll handfaring av skjølum í mun til versiónsstýring fer fram í LU og ikki beinleiðis í UMS. Tað finst sostatt ikki onnur versiónsstýring ella metadata um handfaring av skjølum inni í UMS enn tann, sum verður ásett av LU, tá skjalið verður lisið inn ella dagført. LU skipar øll skjøl í fílservara eftir búningarstøði, evni o.ø. í mun til hvussu innanhýsis mannagongdirnar eru skipaðar. Viðkomandi skjøl og tilfar kann eisini liggja í øðrum skipanum í tilgongdini at gera eitt mál búgvið at lata tinginum, til dømis í teldupostskipanini.




*Skermmynd 5.2.1.3-1 atknýtt skjøl*

Á myndini sæst, hvussu atknýtt skjøl verða lisin inn í skipanina. Fílurnar verða heintaðar frá felags fílservara ella á øðrum atkomiligum drevi.

### 5.2.1.4. Dagsskrá og gerðabók

Í sambandi við allar ting- og nevndarfundir er knýtt ein dagsskrá (pre - action) og ein gerðabók (post - action), sum vera stovnaðar og dagførdar í UMS. Fylgjandi er dømi um, hvussu ein dagsskrá og gerðabók í sambandi við tingfund verður handfarin í skipanini. Sama mannagongd verður stórt sæð nýtt til nevndarfundir, tó at tilgongdin undan og eftir fundin er ymisk.




*Skermmynd 5.2.1.4-1 Dagsskráin fyri tingfund*

Tá tingfundur er á skrá, verður ein dagsskrá stovna og tillaga í mun til, hvat er á skrá.

<u>Metadata</u>

**Nummar:** Leypi nummar, sum verður nullstillað við byrjan av hvørjum tingári.

**Dato:** Teigur at áseta dato fyri tingfund

**Klokkan (Hour):** Nær tingfundur byrjar

**Longd: (Duration):** Longd á tingfundi. Verður ikki nýtt í dag

**Skjal er alment:** Ja/Nei flugubein. Um fundurin kann síggjast á heimasíðuni.

**Heiti:** Heiti á fundi. Verður vanliga ikki brúkt

**Location:** Frítekstur. Er default Løgtingið og kann broytast.

**Topics:** Øll mál, sum skulu á skrá [Sí næstu mynd]



*Skermmynd 5.2.1.4-2 Mál á fundinum*

Her verður skrásett, hvat mál/evni skal á skrá við at velja slag (Case Type) á drop down lista.



*Skermmynd 5.2.1.4-3 Heinta málið inn*

Alt eftir, hvat slag av máli talan er um, og sum er stovnað frammanundan, kann hetta nú heitast við ásetingum um málsnummar, heitið og stutt lýsing av málinum (Content).

Til ber at broyta raðfylgjuna á tingmálum, ið eru á skrá við at nýta “Move up/Move Down”, og at strika málið at koma á skrá við at nýta “Sletta”.



*Skermmynd 5.2.1.4-4 Innihald prefix*

Síðani verður valt, hvat viðgerðarstig málið er á. Alt eftir hvat mál talan er um, ber til at velja viðgerðarstig í drop down lista.



*Skermmynd 5.2.1.4-5 Yvirlit yvir farnar og komandi tingfundir*

Fundir, sum eru settir á skrá ella hildnir, kunnu síggjast á einum yvirliti. Til ber at trýsta seg inn á einstaka fundin at gera broytingar so leingi, sum dagsskráin ikki er endaliga lokað. Her ber eisini til at stovna og rætta gerðabókina (Report), sum er knýtt at hvørjum ting- ella nevndarfundi, og sum kann broytast so leingi, sum tingárið ikki er lokað.




*Skermmynd 5.2.1.4-6 Dømi um eina gerðabók*

Her sæst gerðabók fyri ein einstakan tingfund. Skipanin hevur ein innbygdan tekstritil (editor), sum verður nýttur til at skriva gerðabókina, og hon verður vanliga skrivað samstundis, sum tingfundurin fer fram.

Tá talan er um frítekst, har skrivarin við útgangsstøði í dagsskránni skrivar, hvat fer fram á fundinum og staðfestir niðurstøður frá hvørjum máli sær. Skrivarin ger eisini leinkjur til viðkomandi mál frá heimasíðuni, har til ber at síggja alla almenna kunning av málsviðgerðini. Burtursæð frá “Heiti” (Default “Gerðabók”) eru eingi metadata knýtt at gerðabókini.

### 5.2.1.5. Nevndarfundir

Sum nevnt er hátturin at stovna og skipa dagsskrá og gerðabók til nevndarfundir stórt sæð tann sami. Tí eru nøkur frávik, sum verða lýst í stuttum.

Undir “Umsit tingnevndarfundir” ber til at stovna og broyta innihaldið av dagsskránni fyri hvønn einstakan fund undir hvørjari nevnd.




*Skermmynd 5.2.1.5-1 Yvirlit av øllum verandi nevndum.*




*Skermmynd 5.2.1.5-2 Yvirlit av fundum í Mentanarnevndini – Her tingárið 2017.*



*Skermmynd 5.2.1.5-3 Stovnan av dagsskrá fyri nevndarfund*

Tá nevndarfundur er á skrá, verður ein dagsskrá stovna og tillaga í mun til, hvat er á skrá, og verður hetta gjørt á júst sama hátt sum við tingfundum. Einasta frávikið er í mun til gerðabókina, har tað í mun til tingfundir skal ein góðkenning til frá nevndarlimunum, áðrenn gerðabókin er endalig góðkend.



*Skermmynd 5.2.1.5-4 Gerðabók fyri ein ávísan nevndarfund*

### 5.2.1.6. Umsit nevndarmál

Umframt vanlig nevndarmál, hevur skipanin eina funku, har til ber at stovna serlig nevndarmál, ið av ymiskum orsøkum víkja frá vanligu mannagondini, so sum:

1. Fíggjarnevndarskjøl (í sambandi við t.d. eykajáttan)
2. Nevndarferð (Allar upplýsingar og skjøl í sambandi við nevndarferðir)
3. Ráðførslur (Landstýrisfólk ella løgmaður biður nevndina um ráðførslu í sambandi við ávís mál)
4. Samráð (Nevndin innkallar landsstýrisfólk ella løgmann til samráð í sambandi við málsviðgerð)

Tá talan er um fíggjarnevndarskjal (1) verður málið viðgjørt á nevndarfundi (við skrá og gerðabók) á sama hátt sum onnur mál.

Punkt (3) og (4) verða viðgjørd eins og nevndarfundir.




*Skermmynd 5.2.1.6-1 Skráseting av nevndarmálum*

### 5.2.1.7. Dagsskráin (almennur kalendari)

Á heimasíðuni er ein almennur kalendari. Kalendarin er eitt viku- og mánaðaryvirlit, og her ber til at stovna annaðhvørt ein nevndarfund ella tingfund, herundir eisini aðrar fundir ella tiltøk so sum norðurlanda-, útnorður- ella ungdómstingfundir.

Kalendarin verður umsitin undir “Dagsskráin” í UMS við einum tekstritli, ið umframt vanligan breyðtekst til at lýsa tiltakið eitt nú við fundarskrá, hevur teigarnar “dagfesting” og “tíð” sum metadata.

Kalendarin er ein avmarkað funka soleiðis at skilja, at hon ikki fær ella letur data til aðrar listar (datatalva) í UMS og skal tí føðast manuelt.




*Skermmynd 5.2.1.7-1 Umsit almennan kalendara*

## 5.2.1.8. Brúkaraumsiting

UMS brúkaraumsitingin er ein serskiltur partur av skipanini og er ikki beinleiðis knýtt at aðrari miðsavnaðari brúkarastýring, t.d. Active Directory. Tað er ikki neyðugt hjá brúkaranum at vera ritaður inn á navnaøkið (domain) hjá Løgtinginum umvegis AD hjá KT Landsins fyri at fáa atgongd til skipanina, og ber til at koma inn á skipanina uttanifrá við einum internetkaga og brúkaralogin.

Í brúkaraumsitingini ber millum annað til at stovna, rætta og strika:

- Starvsfólk (Admin users)
- Nevndir - við lýsning av, hvat nevndin tekur sær av (Committees)
- Nevndarsessir – Hvør situr í hvørjari nevnd + eykanevndarlimir (Mixed committees)
- Tingmenn – brúkarastýring og lýsing av tingmanni í tekstritli (Parliaments members)
- Onnur fólk, ið hava eina rollu í t.d Lokalnevndini. (Admin consultants)

Brúkaraupplýsingar eru bara partvíst knýtt til metadata í sambandi við ting- og nevndarfundir. Til dømis verður listin “Tingmenn” (Parliaments members) knýttur til metadata í sambandi við tingmál, nevndarlimir, nevndarviðgerð, uppskotsstillari, spyrjari v.m., men er til dømis einki tilknýti til luttøku á fundi, røðaralista, atkvøðugreiðslu, dagsskrá ella gerðabók, sum kann vera viðkomandi í mun til eina effektivari umsiting.




*Skermmynd 5.2.1.8-1 Umsiting av tingmanni (Parliament members)*




*Skermmynd 5.2.1.8-2 Vel limir í eina ávísa nevnd (Mixed committees)*

### 5.2.2. Heimasíða (CMS) - gjøgnumgongd

Hóast tað her í lýsingini av verandi skipan verður gjørdur munur millum innanhýsis umsitingarskipanina (UMS) og heimasíðuna www.logting.fo (CMS), so er talan um eina og somu skipan. Skipanin hevur 3 brúkara - markamót:

- Heimasíðan www.logting.fo
- Teldlar hjá tingmonnum (Verður ikki lýst nærri)
- Browsaraatgongd hjá umsitingini (Er lýst)




*Skermmynd 5.2.2-1 Forsíða á www.logting.fo*

Umframt at virka sum ein vanlig heimasíða til kunning av almennum tilfari úr Løgtinginum, so nýta starvsfólkini í LU eisini heimasíðuna saman við UMS sum eitt amboð í umsitingini av ting- og nevndararbeiðinum. Eisini er heimasíðan eitt amboð hjá tingmonnum og landsstýrisfólkum at fáa yvirlit og í summum føri eisini atgongd til skjøl og vitan um tingarbeiðið, sum ikki er atkomuligt hjá teimum á annan hátt.

Í einari nýggjari loysn verður lagt upp til, at alt umsitingarligt arbeiðið verður skipað og er til taks í einari innanhýsis UMS, meðan alt tilfar, sum kann almannakunngerast, verður endurgivið á heimasíðuni. Eisini skulu tingmenn fáa mest møguliga kunning og atgongd til tilfar umvegis eina innanhýsis UMS.

Í fylgjandi lýsing fæst ein fatan av, hvussu heimasíðan verður fóðrað av UMS og gevur vónandi íblástur til, hvussu hetta kann skipast framyvir og samvirka við onnur markamót.

### 5.2.2.1. Dagsskráin

Dagsskráin verður í dag skrivað manuelt inn í ein tekstritil í UMS og síðani løgd út á CMS. Starvsfólk í LU seta eftir tørvi leinkjur inn í mun til viðkomandi tilfar, ið er stovnað aðrastaðni í skipanini, til dømis løgtingsmál sum víst niðanfyri.




*Skermmynd 5.2.2.1-1 Dagsskráin á www.logting.fo*

### 5.2.2.2. Nevndarfundir

Á sama hátt sum dagsskráin, verða komandi nevndarfundir skrivaðir manuelt inn í ein tekstritil í UMS og síðani lagdir út á CMS. Eisini her seta starvsfólk í LU eftir tørvi leinkjur inn í mun til viðkomandi tilfar, ið er stovnað aðrastaðni í skipanini.




*Skermmynd 5.2.2.2-1 Nevndarfundir á www.logting.fo*

# 5.2.2.3. Árskalendari (1)

Kalendarin er eitt yvirlit fyri serligar dagar í tingárinum og fundir innan norðurlandaráðið og útnorðurráðið. Kalendarin kann leggjast saman í eftirfylgjandi Árskalendari (2)




*Skermmynd 5.2.2.3-1 Árskalendari á www.logting.fo (1)*

# 5.2.2.4. Árskalendari (2)

Kalendarin er eitt viku- og mánaðaryvirlit fyri ting- og nevndararbeiðið. Kalendarin verður umsitin undir “Dagsskráin” í UMS við einum tekstritli, ið umframt breyðtekst hevur dagfesting og tíð sum metadata. Kalendarin kann leggjast saman við áðurnevnda Árskalendari (1). Lagt verður upp til at knýta eina “tiltaks” - funku til umsitingina av øllum ting- og nevndarfundum, so hetta kann útgevast beinleiðis á kalendaran, sum sært bæði í UMS og CMS.




*Skermmynd 5.2.2.4-1 Árskalendari (2)*

## 5.2.2.5. Vikuætlan tingsins

Kalendarin er eitt yvirlit av føstum fundum í Løgtinginum (Vikuhjól). Hetta er ein innanhýsis kunning til umsiting og tingmenn og er ein vanlig undirsíða uttan beinleiðis tilknýti til UMS.




| | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgtingsfundur | | 13.30 | 11.00 | 13.30 | 9.30 |
| Formansskapur | | 9.30 | | | |
| Fíggjarnevnd | | | | 9.00 | |
| Landsstýrismálanevnd | 9.00 | | | | |
| Mentanarnevnd | | | 9.00 | | |
| Rættarnevnd | | | 9.00 | | |
| Trivnaðarnevnd | | 9.00 | | | |
| Uttanlandsnevnd | | | | 9.00 | |
| Vinnunevnd | | 9.00 | | | |
| Aðrar nevndir | | | | | |

*Skermmynd 5.2.2.5-1 Vikuætlan tingsins*

## 5.2.2.6. Tingmál

Undir Tingmál liggur fylgjandi:

1. Vanlig tingmál (Lógaruppskot, ríkislógartilmæli, uppskot til samtyktar, fíggjarlógaruppskot)
2. Skrivligir fyrispurningar
3. Spurningar § 52a
4. Munnligir fyrispurningar

5. Frágreiðingar
6. Tinglisti (Lógaruppskot, ríkislógartilmæli, uppskot til samtyktar, fíggjarlógaruppskot), sí meira undir 5.2.2.6.1.
7. Skriv til Tingið
8. Løgtingstíðindi 1880-1997. Skjalasavn við løgtingstíðindum, ið liggja á https://logting.elektron.fo/lgt og sum eru goymt í GIF, – formati. Til ber at blaða, men ikki at leita í savninum.

Við undantaki av (8) Løgtingstíðindi 1880-1997 kemur alt tilfar undir Tingmál frá UMS og er metadata (yvirskriftir) skipað í mun til, hvat slag av málum talan er um.




*Skermmynd 5.2.2.6-1 Tingmál - Vanlig tingmál*

#### 5.2.2.6.1. Tinglisti (6)

Tinglistin vísir eitt yvirlit (sýning) yvir øll mál, sum liggja undir Vanlig tingmál (1), men ikki onnur mál (2),(3),(4),(5),(7). Tað serliga við Tinglistanum er, at hann til dagligt verður nýttur sum eitt týðandi amboð hjá LU, tingmonnum og øðrum, at fáa yvirlit aktuell mál og hvat viðgerðarstigi málið er á, t.d. til 2. viðgerð ella er í nevnd.



Forsíða
Dagsskráin
Tingmál
Vanlig tingmál
Skrivligir fyrispurningar
Spurningar § 52 a
Munnligir fyrispurningar
Frágreiðingar
Tinglisti
Skriv til Tingið
Løgtingstíðindi 1880-1997
Gerðabókin
Tingnevndir
Lógir
Tingmenn
Umsiting
Slóðir
Ymiskt

Orðaskifti beinleiðis

Leiting

Løgtingstíðindi

Tinglisti 2018

Málsslag: øll mál
Vel nevnd: allar nevndir

| Alment nummar | Dagfesting | Heiti | 1. viðgerð | 2. viðgerð | 3. viðgerð | Tingnevnd 1 | Tingnevnd 2 | Lóg nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð (Tunlar norður um Fjall) | 10-09-2018 | | | Rættarnevndin | | |
| 2/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til samtyktar um ársfrágreiðing frá Løgtingsins umboðsmanni fyri árið 2016 | 10-09-2018 | | | Rættarnevndin | | |
| 3/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til samtyktar um ársfrágreiðing frá Løgtingsins umboðsmanni fyri árið 2017 | 10-09-2018 | | | Rættarnevndin | | |
| 4/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um varskógvaraskipan fyri alment sett starvsfólk (Varskógvaralógin) | 10-09-2018 | | | Fíggjarnevndin | | |
| 5/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu. (Broyta áseting um gildistíð fyri koyrikort til tey eldru) | 19-09-2018 | | | Rættarnevndin | | |
| 6/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Ókeypis læknaváttan) | 19-09-2018 | | | Trivnaðarnevndin | | |
| 7/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (Ásetingar um brotpensjón) | 25-09-2018 | | | Trivnaðarnevndin | | |
| 8/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn (Sjúka í frítíðini telur ikki sum frítíð) | | | | | | |
| 9/2018 | 21-08-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (Løgfrøðiligt kynsskifti) | | | | | | |
| 10/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til samtyktar um eina listaskúlaskipan | 20-09-2018 | | | | | |
| 11/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Hækking av grundupphædd til fólkapensjón) | 27-09-2018 | | | Trivnaðarnevndin | | |
| 12/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um heimild hjá kommunum at leiga út bústaðir | 27-09-2018 | | | Trivnaðarnevndin | | |
| 13/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um heimild til kommunur at útvega leigubústaðir | 20-09-2018 | | | Trivnaðarnevndin | | |
| 14/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Hækkað inntøkumørk, stuðul og lægri mótrokning) | 27-09-2018 | | | | | |
| 15/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2018 | 27-09-2018 | 09-10-2018 | 09-10-2018 | Fíggjarnevndin | | |
| 16/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Útgjaldið úr Samhaldsfasta skattafrítt) | 27-09-2018 | | | Fíggjarnevndin | | |
| 17/2018 | 10-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka | 27-09-2018 | | | Vinnunevndin | | |
| 18/2018 | 18-09-2018 | Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2018-2 | 25-09-2018 | 09-10-2018 | 09-10-2018 | Fíggjarnevndin | | |
| 19/2018 | 18-09-2018 | Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattafríar gávur) | | | | | | |

*Skermmynd 5.2.2.6.1-1 Tinglisti - Týðandi amboð at skapa yvirlit yvir hvat viðgerðarstig – status - ymisku tingmálini eru á.*

### 5.2.2.7. Gerðabókin



Forsíða
Dagsskráin
Tingmál
Gerðabókin
Tingnevndir
Lógir
Tingmenn
Umsiting
Slóðir
Ymiskt

Orðaskifti beinleiðis

Leiting

Løgtingstíðindi

Gerðabókin 2018

| Fundur | Dagur | |
|---|---|---|
| 1 | 29-07-2018 | Løgtingsfundur |
| 2 | 02-08-2018 | Løgtingsfundur |
| 3 | 21-08-2018 | Løgtingsfundur |
| 4 | 10-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 5 | 19-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 6 | 20-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 7 | 25-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 8 | 26-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 9 | 27-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 10 | 28-09-2018 | Løgtingsfundur |
| 11 | 03-10-2018 | Løgtingsfundur |

*Skermmynd 5.2.2.7-1 Gerðabókin*

Gerðabókin er sýning av øllum frásøgnum frá løgtingsfundum fyri eitt ávíst ár. Við at trýsta seg inn á ávísan tingfund ber til at lesa gerðabókina fyri fundin. Frágreiðingin er skrivað í UMS, undir DAGSSKRÁIN → REPORT og verður leypandi skrivað í tekstritil, meðan fundurin fer fram og síðani løgd alment út. Í tekstinum verður leinkja gjørd til viðkomandi tingmálini, har til ber at síggja skjøl og gongdina í málinum annars.

Gerðabókin hevur metadata: fundur (fundarnummar í árinum), dagur,slag (Default “Løgtingsfundur”) + heiti (default “Gerðabók”)

### 5.2.2.8. Tingnevndir

Undir Tingnevndir er yvirlit yvir allar verandi (virknar) og fyrrverandi (óvirknar)tingnevndir. Við at velja tingnevnd, sær yvirlit av:

- Tekstlýsing av viðkomandi nevnd (Frítekstur)
- Fastir limir
- Varalimir
- Skrivari
- Dagsskrá (Óvirkið/Tómt)
- Gerðabók (Sama sýning og mannagongd sum Gerðabókin (5.2.2.7)
- Nevndarmál (Serlig nevndarmál, ið verða stovnað í UMS)




*Skermmynd 5.2.2.8-1 Yvirlit yvir tingnevndir*

Undir tingnevndir eru allar fastar tingnevndir, umframt tingnevndir, sum eru stovnaðar til serlig langtíðarmál, sum framvegis eru virknar, ella eru í biðistøðu. Undir Aðrar tingnevndir eru nevndir, ið eitt nú eru stovnaðar til serlig mál ella styttri kanningar. Fleiri av hesum nevndum eru í dag óvirknar, tí arbeiðið er endað.

Ein avbjóðing í verandi skipan er, at vísingin av nevndarlimur ikki er knýtt at árstali ella tíðarskeiði, sum tinglimur situr í nevndini. Bert núverandi nevndarlimir vera sýndir, hóast brúkarin t.d. velur 2010 sum árstal orsakað av manglandi tíðarstempling (timestamp) í skipanini.

### 5.2.2.9. Tingmenn

Tingmenn er yvirlit av umboðan á tingi og er umsitið í UMS undir "Admin parliament members". Metadata eru: navn, flokkur,email og image (persónsmynd). Írestandi kunning er frá tekstritli (frítekstur) í UMS.

Undir varamenn er nýggjasti listi/talva við varamonnum fyri løgtingsmenn. Hetta er vanlig undirsíða uttan samvirkan við UMS.


Forsíða
Dagsskráin
Tingmál
Gerðabókin
Tingnevndir
Lógir
Tingmenn
Varamenn
Umsiting
Slóðir
Ymiskt
Orðaskifti beinleiðis
Leiting
Løgtingstíðindi
Verandi tingár - 2018
Løgtingstíðindi 2016

Varamenn fyri tingmenn valdir 2015

| Varatingmaður | Bústaður | Flokkur | Varamaður fyri | Tíðarskeið á tingi |
|---|---|---|---|---|
| Bárður Kass Nielsen | Skála | Nýtt Sjálvstýri | Jógvan Skorheim<br>Kári P Højgaard | 17.09.2015-05.02.2017<br>14.02.2018 -14.03.2018<br>04.10.2017-14.11.2017 |
| Ingolf Sólheim Olsen | Sørvági | Tjóðveldi | Magna Arge<br>Katrin Kallsberg<br>Bjørt Samuelsen<br>Magni Arge | 21.09.2015-24.10.2016<br>17.01.2017-25.06.2017<br>29.06.2017-05.07.2017<br>16.08.2017-22.08.2017<br>14.09.2017 - |
| Joen Magnus Rasmussen | Søldarfirði | Fólkaflokkurin | Anniku Olsen<br>Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur | 30.09.2015-29.10.2015<br>15.11.2016-21.11.2016<br>24.01.2017-<br>26.10.2016-15.11.2016 |
| Petur Háberg | Tórshavn | Tjóðveldi | Óluvu Klettskarð<br>Katrin Kallsberg | 07.10.2015-13.10.2015<br>02.12.2015-08.12.2015 |
| Bjarni Kárason Petersen | Tórshavn | Framsókn | Honnu Jensen<br>Honnu Jensen<br>Honnu Jensen | 25.11.2015-01.12.2015<br>19.04.2016-25.04.2016<br>25.10.2016 - |
| Hilbert Elisson | Vestmanna | Javnaðarflokkurin | Kristin Michelsen<br>Heðin Mortensen<br>Kristin Michelsen<br>Heðin Mortensen<br>Sonju J. Jógvansdóttir<br>Helena D á Neystabø | 01.12.2015- 16.12.2015<br>29.04.2015- 05.05.2016<br>04.08.2016- 15.08.2016<br>21.09.2016- 03.10.2016<br>02.12.2016- 29.12.2016<br>28.11.2017- 04.04.2018<br>19.09.2018 - 03.10.2018 |

*Skermmynd 5.2.2.9-1 Listi yvir varamenn á heimasíðuni*

## 5.2.2.10. Umsiting

Yvirlit fyri starvsfólk og telefonlisti við hentum telefonnr. Hetta er vanlig undirsíða, har metadata um navn, tittul og email er sett manuelt inn á síðuna. Umvegis leinkju á fornavni er samvirkan við UMS, sum vísur eina vangamynd av starvsfólki á sama hátt sum við tingmonnum.

Telefonlistin er undirsíða við lista/talvu uttan samvirkan við UMS.




*Skermmynd 5.2.2.10-1 Umsiting*

### 5.2.2.11. Nýtt

Nýtt – Listi við tíðindum í høgra bredda. Verður stovnað í UMS undir ADMIN NEWS. Metadata eru: heiti og publish date og ber til at tendra og sløkkja tíðindini, sum annars verða skrivað í tekstritli.

### 5.2.2.12. Leiting

Leitifunkan á heimasíðuni er býtt millum Leiting og Løgtingstíðindi.

Í Leiting ber til at uppseta filtur fyri leitingini av øllum tilfari, sum at atkomuligt umvegis UMS:

- Ár (Val millum 2018-1990 frá lista í UMS í valteigi. Um einki ár verður valt, kemur data fyri øll ár.)
- Lógnr. (Frítekstur)
- Leitiorð (Frítekstur)
- Tingnevnd (Val millum nevndir og aðrar nevndir frá lista í UMS í valteigi)
- Uppskotsstillari (Frítekstur)
- Málsslag (Slag av tingmáli frá lista í UMS í valteigi)




*Skermmynd 5.2.2.12-1 Leiting*

## 5.2.2.13. Løgtingstíðindi

Løgtingstíðindi virkar á tann hátt, at árstalið, sum er tilskilað her, er stýrandi fyri, hvørjar upplýsingar brúkarin fær undir Tingmál, Gerðabók og Tingnevndir. Tá brúkarin kemur inn á heimasíðuna er verandi ár sjálvvirkandi ásett. Síðani ber til at velja onnur ár (aftur til 1990).




*Skermmynd 5.2.2.13-1 Løgtingstíðindi*

### 5.2.2.14. Annað tilfar

Á heimasíðuni eru eisini aðrar snarleinkjur, sum ikki eru samvirkandi við UMS, og sum eru vanligar undirsíður ella leinkja til uttanhýsis tilfar.

1. Lógir - Vanlig undirsíða við leinkjum, ið vísa til reglur, lóggávu Løgtingsins og lógasøvn í øðrum londum.
2. Slóðir – Vanlig undirsíða við leinkjum til eitt nú stovnar undir Løgtinginum, flokkar, altjóða felagsskapir.
3. Ymiskt – Vanlig undirsíða við leinkju til viðkomandi tilfar, sum er partur av Løgtinginum. Nógv av hesum vísir til eldri heimasíðu, ið liggur á https://logting.elektron.fo/.
4. Orðaskiftið beinleiðis (Er óvirkið)
5. Tingvarp beinleiðis – Leinkja til http://kvf.fo/webservice/player/logting
6. Løgtingið/Lagtinget/The Lagting – Leinkjur til PDF – faldara á FØ/DK/UK um Løgtingið.

## 5.2.3. Databygnaður

Verandi umsitingarskipan er samansett sum víst á myndini niðanfyri. Í hjáskjali 3 er ER – diagramm av undirliggjandi MySQL datagrunni, ið lýsir talvurnar sum skipanin byggir á. Verandi databygnaður verður ikki lýstur nærri í hesum skjali.




*Skermmynd 5.2.3-1 Yvirlitsmynd MySql datagrunni og talvunum, ið skipanin byggir á.*

# 6. Krøv og ynskir til nýggja loysn

Grundað á ta sannroynd, at bæði tøknin, nýggir hentleikar og hættir at talgilda og umsita mannagongdir hevur ment seg nógv seinastu árini, ynskir Løgtingsumsitingin at fáa eina dagførda umsitingarskipan. Ynskt verður at gagnnýta hesar møguleikar og at fáa eina nútímans loysn, har veitarin við sínum royndum og førleikum kann seta saman ein loysn, sum livir upp til tey ynskir og krøv, sum Løgtingsumsitingin ásetir. Tað er tó einki til hindurs fyri, at veitarin við sínum hugflogi vísir á loysnir, ið fara útum nevndu krøv og skapa eina enn betur loysn, enn lagt verður upp til.

Í lýsingini í verandi skipan (kapittul 4 og 5) hevur veitarin fingið eina fatan av, hvussu tingmál verða umsitin talgilt, og skal nýggja loysnin sum minstamark avspegla somu upplýsingar og funkur, umframt at útbyggja hesar, har tað er neyðugt. Harumframt skal ramman í skipanini víðkast soleiðis, at tað skal bera til at skráseta eitt mál longu við føðing, sum er frá tí løtu, at løgtingsumsitingin tekur eitt mál upp til málsviðgerð, og sum at enda kann gerast eitt tingmál.




*Strikumynd 6-1 Yvirlitsmynd av høvuðspørtum í nýggjari skipan – sæð út frá einum logiskum býti*

## 6.1. Tingmál sum grundarsteinur

Grundarsteinurin í skipanini eru tingmál. Skipanin skal stuðla undir at starvsfólk og tingmenn á einfaldan og skynsaman hátt skulu umsita og fáa atgongd til alla kunning og tilfar, ið knýtir seg at málsviðgerðini av tingmálum. Eitt tingmál føðist í skipanini sum eitt mál, sum eftir at hava fingið málsviðgerð í umsitingini, verður lagt fram sum tingmál, um tað líkur ásettar treytir.




*Strikumynd 6.1-1 Tingmál sum grundarsteinur í skipanin. Strikumyndin er viðheft í hjáskjali 4.*

Á myndini sæst tingmál sum grundarsteinur.

1. **Skjøl** verða leypandi knýtt at málinum.
2. **Eginleikar** verða knýttir at málinum.
3. **Fólk**. Starvsfólk og tingmenn verða knýtt at málinum í mun til leiklut.
4. **Slag**. Øll tingmál verða eyðmerkt við slag av máli, talan er um. Hetta er avgerandi fyri, hvussu víðari málsviðgerðin fer fram.
5. **Nevndir** verða knýttar at teimum málum, ið skulu viðgerast í nevnd.
6. **Málsviðgerðarstig** vísir, hvussu rensli er fyri ymisku sløgini av tingmálum.
7. **Gluggar** eru brúkaramarkamót, sum eru skraddaraseymað til ein ávísan bólk av brúkarum, so sum starvsfólk, tingmenn og almenningur.

Fyri, at tingmál kann stovnast og umsitast skulu undirliggjandi fortreytir vera til staðar og kunna knýtast at tingmálum. Talan er um grundleggjandi listar/talvur:

1. **Fólk:** Starvsfólk og tingmenn verða skrásett við upprunadata (stamdata) og metadata.
2. **Málsviðgerðarstig:** Øll mál sum vera góðkent at taka upp til málsviðgerð, skulu knýtast til eitt málsviðgerðarstig í skipanini og skal kunna broytast í mun til, hvar málið liggur í renslinum sum er gjaldandi fyri viðkomandi mál.

3. **Nevndir:** Nevnd verður stovnað og skrásett við upprunadata (stamdata) og metadata. Tingmenn og starvsfólk verður knýtt at nevndini við leiklutum.
4. **Atgongd:** Skipanin skal ásetast hvør brúkari ella brúkarabólkur hevur atgongd til hvat.
5. **Mál:** Atlit skal takast til, at summi tingmál eru trúnaðarmál í nevndarviðgerð og skal tað vera lætt at áseta, nær eitt mál er í trúnaði ella ikki.
6. **Skjøl:** Atlit skal takast til, at summi skjøl eru trúnaðarskjøl í nevndarviðgerð. Tað skal vera lætt at áseta, nær eitt skjal er í trúnaði ella ikki.
7. **Tíðarstýring:** Skapanin skal hava eina tíðarstýring so starvsfólk, tingmenn og almenningurin kann fáa eitt yvirlit yvir, hvussu leingi og hvar tingmálini liggja í ymisku málsviðgerðarstigunum. Hetta skal vísast við dagfesting, sum starvsfólkini tó kunnu broyta manuelt um frávik verður gjørt við tíðarfreistini.

### 6.1.1. Samvirkan millum slag av tingmáli og málsviðgerðarstig

Sum lýst í 5.1 “Lýsing av mannagongdum í Løgtinginum”, eru fastar mannagongdir gjaldandi fyri øll tingmál sum koma til tingviðgerð. Tingskipanin ásetir beinleiðis, hvussu málsviðgerðin alt eftir slagi av tingmáli skal skipast, og hvørjar tíðarfreistir eru galdandi fyri hvørt málsviðgerðarstig sær. Nýggja loysnin skal byggjast upp rundanum hesar mannagongdir, tí júst hesar mynda gerandisdagin hjá bæði starvsfólki og tingmonnum.

| Slag/Viðgerðarstig/Teljari (tíðarfreist) | Lógar-uppskot | Fíggjarlógar-uppskot | Ríkislógar-tilmæli | Uppskot til sam-tyktar | Skrivligur fyrispurningur | §52 a Spurningur | Ófrá-boðaður spurningar | Munnligur fyrispurn-ingur | Frágreiðing | Skrivi til tingið | Serligar fráboð-anir |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Innkomið** | Inn-komið | Inn-komið | Inn-komið | Inn-komið | Inn-komið | Inn-komið | Svar | Inn-komið | Inn-komið | Inn-komið | Framløga |
| **Góðkent sum tingmál** | Góðkent sum tingmál | Góðkent sum tingmál | Góðkent sum tingmál | Góðkent sum tingmál | Góðkent sum tingmál | Góðkent sum tingmál | | Góðkent sum tingmál | Framløga | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | Min. 3/6 d til | Min. 3 d til | Min. 3/6 d til | Min. 3 d til | Atkvøðu-greiðsla | Max. 10 d til | | Svar | Max. 6 d til | | |
| **Framløga** | Framløga | Framløga | Framløga | Framløga | Svar | Svar | | | Aðal--orðaskifti | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | Min. 2 d til | Min. 2 d til | Min. 2 d til | Min. 2 d til | | | | | | | |
| **1. viðgerð** | 1. viðgerð | 1. viðgerð | 1. viðgerð | 1. viðgerð | | | | | | | |
| **1. viðgerð - framhald** | 1. viðgerð - framhald | 1. viðgerð – framhald | 1. viðgerð – framh. | 1. viðgerð – framh. | | | | | | | |
| **Í nevnd** | Í nevnd | Í nevnd | Í nevnd | Í nevnd | | | | | | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | 3/min. 2 d um álit | 3/min. 2 d um álit | 3/min. 2d um álit | 3/min. 2d d um álit | | | | | | | |
| **2. viðgerð** | 2. viðgerð | 2. viðgerð | 2. viðgerð | 2. viðgerð | | | | | | | |
| **Í nevnd** | Í nevnd | Í nevnd | Í nevnd | Í nevnd | | | | | | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | Min. 2 d | Min. 2 d | Min. 2 d | Min. 2 d | | | | | | | |
| **2. viðgerð - framhald** | 2. viðgerð - framhald | 2. viðgerð - framhald | 2. viðgerð – framh. | 2. viðgerð – framh. | | | | | | | |
| **Atkvøðugreiðsla** | Atkvøðu-greiðsla | Atkvøðu-greiðsla | Atkvøðu-greiðsla | Atkvøðu-greiðsla | | | | | | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | Min. 2 d. | Min. 2 d. | Min. 2 d. | Max. 14 d. til | | | | | | | |
| **3. viðgerð** | 3. viðgerð | 3. viðgerð | 3. viðgerð | Avgreitt | | | | | | | |
| **Í nevnd** | Í nevnd | Í nevnd | Í nevnd | | | | | | | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | Min. 2 d. | Min. 2 d. | Min. 2 d | | | | | | | | |
| **3. viðgerð – framhald** | 3. viðgerð – framhald | 3. viðgerð - framhald | 3. viðgerð – framh. | | | | | | | | |
| **Atkvøðugreiðsla** | Atkvøðu-greiðsla | Atkvøðu-greiðsla | Atkvøðu-greiðsla | | | | | | | | |
| **Teljari (tíðarfreist)** | Max. 10 d. til | Max. 10 d. til | Max. 10 d. til | | | | | | | | |
| **Avgreitt** | Avgreitt | Avgreitt | Avgreitt | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | |

*Talva 6.1.1-1 Matrisa av málsviðgerðini av tingmálum í mun til slag, umframt ásettar tíðarfreistir millum viðgerðarstigini*

Aðalmálið við skipanini skal tí at vera, at hon í gerandisdegnum er eitt vælvirkandi og hent amboð at stýra tingmálum gjøgnum málsviðgerðarstigini, og at allir áhugahavarar – tingmenn, starvsfólk og almenningurin – skjótt og lætt kunnu finna upplýsingar og tilfar um øll tingmál, sum eru ella hava verið til viðgerðar. Í talvuni er yvirlit yvir øll málsviðgerðarstig sum eitt tingmál kanna vera í, alt eftir hvat slag av tingmáli, talan er um.

## 6.2. Ein skipan – fleiri gluggar

Umsitingarskipanin er í 1. atløgu ein innanhýsis skipan, har tað er skilnaður millum starvsfólk og tingmenn í mun til, hvat er mest viðkomandi at hava atgongd til. Størsti parturin av ting- og nevndararbeiði er alment, og tí skal skipanin kunna leggja kunning og tilfar út á heimasíðuna í tann mun, sum innanhýsis mannagongdir fyriskriva. Hóast tað sum nevnt áður er gjørdur skilnaður millum innanhýsis skipanina (UMS) og heimasíðu (CMS), so er talan um eina og somu skipan, og tað er upp til veitaran, hvussu hetta tøkniliga verður skipað. Avgerandi er, at starvsfólk, tingmenn og almenningurin fær hvør sín glugga (views), ið er skraddaraseymaður til teirra tørv at umsita ella fáa kunning úr skipanini.




*Skitsa 6.2-1 Gluggi - Tingmenn - Tilvildarligt dømi.*

Myndin omanfyri er dømi um ein glugga fyri tingmenn, har skipanin millum annað umvegis metadata kann vísa fram viðkomandi skjøl, kunning ella boð og harvið geva øllum tingmonnum eitt amboð, ið savnar og fremur ting- og nevndararbeiðið. Tað er her umráðandi at viðmerkja, at myndin er ein einføld skitsa, sum hevur til endamáls at geva eina yvirskipaða fatan av, hvat ein tingmaður møguliga skal síggja í sínum glugga. Ítøkiliga innihaldið er ikki endaligt og uppseting/snið tilvildarligt. Uppgávan hjá veitaranum verður tí í hesum sambandi at menna hesar gluggar í tøttum samstarvi við Løgtingsumsitingina og royna frumsnið (prototypir) saman við brúkarunum, so endaliga útgávan er ein framkomin heildarloysn í mun til innihald, funkur og atlit til brúkaraupplivingina, **sí eisini 6.7**.

## 6.3. FÓLK - Brúkaraumsiting

Eins og nevnt verður seinni í 6.7.3, so eigur brúkaraumsitingin (Fólk) í nýggju loysnini at samvirka við Active Directory, sum í dag verður umsitin hjá KT Landsins.

Brúkarastýringin skal verða miðdepilin fyri øllum tí, sum knýtir seg til viðurskifti, sum viðkoma starvsfólkum og tingmonnum:

- **Atgongd**. Øll atgongd til partar av skipanini, atgongd til nevndir, tingarbeiði, skjøl og annað tilfar, ið skal stýrast í brúkarastýringini, har høvuðsumsitarar (superadmin) skulu kunna tilluta brúkara- og umsitingarrættindi og stovna leiklutir og bólkar við útbýttum (distributed) rættindum.

- Allir **leiklutir og ognarskapur** hjá tingmonnum og starvsfólkum skulu knýtast til brúkaran í FÓLK og loggast, so sum:
    - Nevndarsessir, ið verða tillutaðir tingmanni sum limur, varalimur, formaður og næstformaður.
    - Uppskotsstillari, har tað verður skrásett, hvør er uppskotsstillarin og ognari av einum tingmáli ella skjali
    - Skrivari, ið er starvsfólk í umsitingini.
    - Aðrir leiklutir, sum tingmenn ella starvsfólk kunnu hava í málsviðgerðini.
- **Gerðir og luttøka**
    - Í skipanini skal bera til at skráseta alla luttøku hjá tingmonnum:
        - Á nevndarfundum (luttikið/ ikki luttikið)
        - Á tingfundum (luttikið/ikki luttikið)
        - Atkvøðugreiðsla av tingmáli(Fyri/móti/blankt)

Yvirskipað er brúkarastøðan henda:

| **Atgongd/Brúkari - Matrisa** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Umsiting (Superuser)** | **Umsiting (Standard)** | **Nevnd** | **Alment** |
| **Ikki góðkent** | x | x | | |
| **Nevnd/Trúnaðarskjøl** | x | x | x | |
| **Nevnd/Almenn skjøl** | x | x | x | |
| **Alment/Tingmenn** | x | x | x | x |

*Talva 6.3-1 Atgongd-Brúkari matrisa*

<u>Atgongd</u>

**Ikki góðkent eru skjøl**, sum umsitingin ikki hevur lagt út at síggja til onnur enn starvsfólkini sjálv.

**Trúnaðarskjøl** eru trúnaðarskjøl, sum bert umsitingin og nevndarlimir í ávísari nevnd hava atgongd til.

**Almenn skjøl** eru til taks hjá øllum tingmonnum og almenninginum sum heild.

Brúkarar

**Umsiting (Superuser):** Starvsfólk við fullari atgongd (Superuser).

**Umsiting (Standard):** Starvsfólk við vanligari atgongd (Standard)

**Nevnd:** Tingmenn, ið sita í nevndum og síggja tilfar og upplýsingar, ið er knýtt til ávísu nevndina.

**Almennir brúkarar (uttan innritan):** Skjøl og tilfar er alment fyri bæði tingmonnum og almenninginum. Starvsfólk skulu við funkum gera av, um tilfarið skal vera tókt alment á heimasíðu ella ikki.

## 6.4. Meta- og upprunadata

Felags fyri allar staklutir í skipanini er, at metadata verður atknýtt, og at allar hendingar ella støður í skipanini verða skrásettar (loggur) við teimum metadata, sum gera seg gjaldandi í ávísu støðuni.

Veitarin skal eisini hava fyri eyga, at upprunadata (stamdata) sum verður skrásett í skipanini er eintýðugt, og mest møguligt kann endurnýtast ella leitast fram aftur í øðrum støðum í skipanini, so tað slepst undan redundantum data. Aðalreglan í skipanini skal tí vera, at tað við undantaki av tí tilfari, sum starvsfólk og tingmenn leypandi leggja inn í skipanina, skal vera so lítið av fríteksti, sum til ber. Allir teigar og ásetingar skulu heintast úr eintýðugum listum, sum eru lætt atkomiligir í tí støðu, tingmálið verður viðgjørt og umsitið í.

## 6.5. Framkomin leitiskipan

Eitt sera týðandi amboð hjá bæði starvsfólki, tingmonnum og almenninginum er ein vælvirkandi og skynsom leitifunka. Umframt at gera alt tilfar lætt atkomuligt í einum vælskipaðum bygnaði, ið kann síggjast umvegis brúkaragluggar, skal skipanin eisini hava ein framkomna leitifunku, ið skal vera tríbýtt:

| Innanifrá | | Uttanifrá |
|---|---|---|
| **Starvsfólk** | **Tingmenn** | **Almenningur** |
| Hava fulla atgongd til alt tilfar í skipanini, tó treytað av teimum rættindi, ið teimum er tillutað av høvuðsumsitarum. | Hava rætt til at síggja alt tilfar viðvíkjandi tingmálum, men hava ikki atgongd til tilfar og skjøl, ið verða ella eru málsviðsgjørd í umsitingini áðrenn tey verða til tingmál. | Hevur atgongd til alt tilfar, ið verður skrásett sum alment í skipanini og lagt út á heimasíðuna. |

*Talva 6.5-1 Tríbýtt leitifunka*

Fylgjandi sæst strikumynd av, hvat ymisku brúkararnir hava atgongd til at leita eftir í skipanini.




*Strikumynd 6.5-2 LEITA - Framkomin leitifunka í UMS og CMS.*

Lagt verður lagt upp til, at leitifunkan hevur í minsta lagi 2 hættir at skipa leitingina:

1. **Leiting við fríteksti**
    - Leitiháttur,  ið líkist Google – leiting ella líkandi
    - Leitiháttur við beinleiðis uppslagi (Live Search).
    - Leitiúrslit, ið verða skipað eftir innihaldi og typu av innihaldi (skipað eftir metadata/typu). Íblástur kann eitt nú koma frá "Search Refiner".
2. **Víðkað leiting**
    - Leiting við filtur, ið eitt nú kunn vera:
        i. Tíðarskeið - Frá – til  (Til dømis sum drop – down)
        ii. Ár (Til dømis sum drop – down)
        iii. Lóg nr (Frítekstur)
        iv. Leitiorð  (Frítekstur)
        v. Tingnevnd (Til dømis sum drop – down)
        vi. Uppskortsstillari (Frítektur við til dømis beinleiðis uppslagi (Live search))
        vii. Málsslag  (Til dømis sum drop – down)

## 6.6. Miðsavnan av kunning

Umframt at virka sum talgilt stýringsamboð hjá fyrst og fremst starvsfólkum, so skal skipanin eisini stuðla teimum í arbeiðinum at samskifta og kunna tingmenn um ting- og nevndararbeiði, sum er viðkomandi fyri hvønn einstakan tingmann. Hetta skal gerast við at miðsavna kunningar- og samskiftisuppgávuna, so tað verður lætt at senda kunning,

innkallingar og fráboða um skjøl til eitt nú tingmenn, starvsfólk, tingnevndir, formansskapin og aðrar hugsandi bólkar, sum eru partar av tingarbeiðinum. Í dag nýta starvsfólk nógva tíð at senda út kunning og umsita ymiskar fundir í skipanum, sum liggja uttanfyri verandi umsitingarskipan, so sum at:

- senda út skjøl og tilfar til einstaklingar og bólkar innanhýsis í tinginum og nevndum.
- senda út stuttar fráboðanir um ymiskt viðkomandi, eitt nú tá nýggj skjøl eru tøk í tingnevndum ella í tinginum
- umsita ting- og nevndarfundir við innkallingum, broytingum og avlýsingum.

Veitarin skal tí hugsa hetta samskifti inn í loysnina, so hetta samskiftið annaðhvørt er partur av loysnini, ella at nýggja skipanin samvirkar við aðrar skipanir um hetta.

## 6.7. Krøv til brúkarauppliving (UX og UI)

Við útboðnum verður ikki lagt upp til ávísa sniðgeving ella rætningslinjur fyri brúkarauppliving í nýggju loysnini. Veitarin hevur her fríar hendur til at koma við einum samlaðum uppskoti til, hvussu øll markamót - bæði innanhýsis (UMS) og heimasíðan (CMS) er sniðgivin og skipað í mun til "best practise" innan UX.  Tað verður væntað, at veitarin skilir, at talan er um myndugleikaarbeiði, og at brúkarin skal fáa kenslu av opinleika við øllum atkomuligum tilfari um tingarbeiði, og at tað skal vera skjótt og einfalt at finna upplýsingar og tilfar. Tí skal veitarin vísa á, hvussu ein nýggj loysn er skapað, og tað er ein fyrimunur at kunna vísa á líknandi loysnir og royndir, ið veitarin hevur veitt ella er førur fyri at veita.

## 6.8. Krøv til tøkniliga veiting

Veitarin kemur sum útgangsstøðið sjálvur við uppskoti til, hvør tøkni verður nýtt bæði á servara- og applikatiónsstigi, og hvussu henda verður uppsett í mun til at skapa eina optimala loysn. Tó skal takast atlit til, at Løgtingið í dag er partur av hýsingarumhvørvi hjá KT Landsins, og at tað tí er neyðugt at taka atlit til tær fortreytir og krøv, ið eru galdandi fyri hetta umhvørvið.

Á spurnarfundi tann 12. november 2018 verður KT Landsins umboðað, og her ber hjá veitarum at fáa nærri kunning um viðurskifti, sum knýta seg til hýsing, rakstur, trygd og annað í hesum sambandi.

### 6.8.1. Hýsing og rakstrarumhvørvi

Loysnin verður hýst innanfyri karmarnar hjá KT Landsins, sum eftir nærri avtalu við veitaran, letur neyðugan kapasitet sum part av sínamillum avtalu við Løgtingsumsitingina.

Lisensir fyri Microsoft stýriskipan til virtuellar servarar er frammanundan við í veitingini frá KT Landsins. Um veitarin krevur gjald í sambandi við lisensir ella onnur gjøld frá 3. parts veitara, skal hetta greitt tilskilast sum partur av prísinum fyri rakstur.

KT Landsins hevur avtalur um lisensir í hýsingarumhvørvinum og hevur ábyrgd av lisenscompliance. Tí skulu útreiðslur í samband við keyp og endurnýggjan av lisensum altíð avtalast við KT Landsins, ið hevur 1. rætt at lata hesar sum part av avtaluni við Løgtingið um hýsing.

Tilboðsgevi skal upplýsa ein samlaðan rakstrarkostnað, sum er galdandi í minsta lagi 5 ár frá tí degi, at loysnin er royndarkoyrd og endaliga verksett. Rakstrarkostnaðurin skal útgreinast í so stóran mun sum til ber, so Løgtingsumsitingin tryggjar sær neyðugt gjøgnumskygni við leypandi rakstrarútreiðslunum. Endaliga áramálið fyri rakstraravtalu og tilhoyrandi tænastusáttmála millum veitara og Løgtingsumsitingina kann víkja frá hesum áramáli, um tað eru eyðsýndir fyrimunir hjá Løgtingsumsitingini við hesum. Áramálið verður avtalað nærri í sambandi við avtalu um sáttmála.

### 6.8.2. Stýriskipan

Veitarin kann nýta fylgjandi stýriskipanir til loysnina:

- Windows Server 2012
- Windows Server 2012 R2
- Windows Server 2016
- Red Hat
- Centos
- Ubuntu

Um Microsoft Windows servarar verða nýttir, verður mælt til at nýta Windows Server 2016, tí hetta í verandi løtu tryggjar longst møguliga support og viðlíkahald frá Microsoft. Í sama mun verður tað í sambandi við Linux stýriskipanir mælt til at nýta Red Hat, sum hevur neyðuga brúkarahjálp og sum ger, at tað er lættari at reka í mun til eitt nú patch management.

### 6.8.3. Krav til brúkarastýring

Brúkarastýringin í skipanini eigur at vera bygd á tilknýtið til Active Directory, sum verður umsitin hjá KT Landsins. Øll starvsfólk og tingmenn verða í dag umsitin av AD í mun til innritan á KT – kervi hjá LU, og hevur tað tí nakrar yvirskipaðar fyrimunir, at ein nýggj skipan er knýtt til AD, sí eisini 6.3.

### 6.8.4. Trygdarkrøv

Veitarin skal sjálvur tryggja loysnina á applikatiónsstigi (Application Compliance) og at loysnin er trygg í mun til brúkarastýring, atgongd, trúnað og rættleika (CIA – aðalreglur). Ein partur av hesum er ein sporførisskipan (logging), har tað sum minstamark skal bera til at spora gerðir (handling), sum fara fram, av høvuðsumsitarum (administrator).

KT Landsins átekur sær yvirskipaðu trygdina á servara- og netverkstigi sum part av hýsingini. KT Landsins ger í hesum sambandi javnan trygdarkanningar, eitt nú “penetration test”, og skulu tilráðingar og krøv um tillagingar í hesum sambandi altíð takast til eftirtektar.

Tað er ábyrgdin hjá Løgtingsumsitingini at fyriskipa tilbúgving í mun til egnar serskipanir, og tí skal veitarin av loysnini gera eina tilbúgvingarætlan, har tað greitt framgongur, hvussu brek og óvæntaðar støður skulu handfarast av

starvsfólkunum, og hvussu veitarin skipar seg, so hann rættstundis kann veita neyðuga hjálp. Ásetingar um hetta skulu útgreinast í rakstrarhondbók, sí 6.8.7.

### 6.8.5. Atlit til persónsupplýsingarlógina/GDPR

General Data Protection Regulation (GDPR) er fyriskipan um dátuviðgerð innan ES. Hetta hevur m.a. við sær, at persónsdata ikki má sendast víðari uttan samtykki, og skal hetta kunna skjalfestast av eigaranum av telduskipanum. Arbeitt verður við at at dagføra føroysku persónsupplýsingarlógina í mun til GDPR, sum helst verður altjóða standardur. Tí skal nýggja loysnin lúka krøv í mun til persónsupplýsingarlógina og GDPR, í tann mun loysnin savnar og viðger persónsupplýsingar. Veitarin skal sum part av menningini gera nærru avtalu við LU, hvussu GDPR kann hugsast inn í skipanina og mannagongdir við nýtslu av henni.

### 6.8.6. Kervisumsiting

KT Landsins tekur sær av og tryggjar alt datasamskiftið á innanhýsis netverkum og tekur sær av trygdarverju mótvegis internetinum við firewalls, antivirus og aðrari tøkni.

### 6.8.7. Viðlíkahald og skjalfesting

Veitarin skal lýsa, hvussu loysnin verður viðlíkahildin á applikatiónsstigi og skal í minsta lagi handa Løgtingsumsitingini fylgjandi skjalfesting og handbøkur (gjarna talgilt):

1. Skjalfesting av skipan, herundir
   a. Dataarkitekturur og dataflow
   b. Datagrunnar og datatalvur (ER – diagramm/ir)
   c. Undirstøðukervi á applikatiónsstøði.
2. Rakstrar - handbók sum lýsir, hvussu loysnin/skipanin skal rekast við atliti til eitt nú:
   a. Brúkarastýring, herundir hvussu brúkarar verða stovnaðir, viðlíkahildnir og strikaðir.
   b. Hvussu ymisk rættindi verða tillutað.
   c. Rakstraruppgávur, sum skulu fremjast av starvsfólki í LU.
   d. Yvirveking og aðrar yvirskipaðar uppgávur sum tryggja, at skipanin virkar sum hon skal.
3. Brúkaravegleiðingar til starvsfólk at umsita skipanina í mun til UMS og CMS.

### 6.8.8. Backup

Backup verður mett sum ein partur av víðlíkahaldinum. KT Landsins tekur sær av og hevur fastar mannagongdir í mun til backup á servarastøði. Veitarin skal lýsa, hvussu nøktandi backup verður tikið av loysnini á applikatiónsstigi og gera eina lýsing av, hvussu skipanin verður endurskapt við røttum og dagførdum dáta.

## 6.9. Almenn krøv til veitaran

Umframt ítøkiligu krøvini til loysnina, skal veitarin eisini lúka nøkur yvirskipað krøv, sum bæði tryggja, at rammurnar fyri verkætlanin eru so góðar sum til ber, og at veitingin er langtíðar haldfør fyri allar partar.

### 6.9.1. Kjølfesti í Føroyum

Tað er eitt krav, at veitarin av loysnini er føroysk skrásett fyritøka og skal hava í mesta mun tilknýtið til Føroyar:

- reka sítt virksemi í Føroyum
- hava starvsfólk, sum arbeiða í Føroyum
- nýta føroyskt sum høvuðsmál í samskiftinum við Løgtingsumsitingina
- at kundatænastan, ið skal veita leypandi brúkarahjálp til starvsfólk og onnur skal hava heimstað í Føroyum ella sum minstamark skilja føroyskt í skrift og talu.

Tað er einki sum forðar fyri, at veitarin kann knýta aðrar veitarar og samstarvsfelagar, ið ikki eru staðsettir í Føroyum, til at loysa serligar partar av veitingini, men avgerandi er, at vitan og førleikar hjá útlendskum veitarum ella samstarvsfeløgum verða kjølfestir í Føroyum.

### 6.9.2. Organisatión og førleikar

Veitarin skal lýsa, hvørji starvsfólk verða knýtt at verkætlanini, og hvørjar førleikar hesi hava við atliti til krøvini, ið sett verða til loysnina. Veitarin skal viðhefta lívsrensl (CV) fyri tey starvsfólk, ið eru partur av veitingini og luttaka í verkætlanini. Lívsrenslið skal sum minstamark upplýsa:

1. Navn

2. Tittul í fyritøku

3. Starvstíð (Árstal fyri starvsbyrjan)

4. Viðkomandi útbúgving

5. Viðkomandi førleikamenning og skeið

6. Tilvísing til líknandi verkætlanir

7. Annað viðkomandi

### 6.9.3. Verkætlanarleiðsla

Umframt tilknýti av starvsfólki til menningararbeiðið skal veitarin eisini útgreina, hvussu ætlanin er at skipa menningararbeiðið við eitt nú at nýta ávísan menningarfrymil. Her skal vísast á, hvørjar royndir og førleikar veitarin hevur við hesum arbeiðshátti frá øðrum verkætlanum. Avgerandi er, at menningin fer fram í tøttum samstarvi við starvsfólkið í LU, og tí skal helst ein “agilur” verkætlanarfrymil nýtast gjøgnum alla menningartilgongdina.

Veitarin skal frammanundan boða Løgtingsumsitingini frá, hvør verður verkætlanarleiðari vegna veitaran og upplýsa lívsrensl sum nevnt í 6.9.2. Hesin kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við innanhýsis verkætlanarleiðara hjá LU, sum verður settur at samskipa samstarvi við veitaran vegna LU.

### 6.9.4. Fíggjarviðurskifti

Fyri at tryggja, at veitarin hevur síni fíggjarviðurskifti í lagi, skal hann kunna vísa á roknskapartøl fyri seinastu 3 árini og útlit fyri næstu 3 árini, sum sáttmálin fevnir um. LU kann eisini í sambandi við framløgufundin biðja veitaran um at senda eina váttan fyri, at fyritøkan ikki hevur nakað fíggjarligt útistandandi við almennar skatta- og tollmyndugleikar ella biðja um útgreining av øðrum fíggjarviðurskiftum.

## 6.10. Skipan av verkætlan

Veitarin skal gera eina allýsing av, hvussu øll verkætlanin verður skipað, frá tí at sjálv verkætlanin fer í gongd, til loysnin verður endaliga latin Løgtingsumsitingini.

### 6.10.1. Stýrisbólkur

Verkætlanin hevur ein stýrisbólk, sum skal tryggja at arbeiðið fer fram sum ætlað, og at allar avtalur millum veitaran og Løgtingsumsitingina vera hildnar. Formaður í stýrisbólkinum er løgtingsstjórin, meðan veitarin kemur við uppskoti um stýrisbólkalim, har viðkomandi sum minstamark skal vera knýttur til leiðslu- ella fíggjarleiðslu hjá veitaranum. Harumframt situr verkætlanarleiðarin hjá veitaranum og innanhýsis verkætlanarleiðarin hjá LU í stýrisbólkinum :

| | Stýrisbólkur | |
|---|---|---|
| 1 | Johnhard Klettheyggj, Løgtingsstjóri | Formaður |
| 2 | Umboð fyri leiðslu veitarans | |
| 3 | Verkætlanarleiðari hjá veitara | Innkallar og fyriskipar stýrisbólkafundir |
| 4 | Verkætlanarleiðari hjá Løgtinginum | Skrivari |

*Talva 6.10.1-1 Stýrisbólkur*

### 6.10.2. Tíðarætlan

Ein vælskipað og greið tíðarætlan skal fyriliggja, har veitarin útgreinar allar partar av tilgongdini, og har tað er greitt, hvussu ymisku menningarstigini vera skipað í mun til hvørt annað. Veitarin ger sjálvur av, hvussu hetta verður lýst við strikumyndum, talvum ella øðrum, ið kann lýsa hetta greitt.

### 6.10.3. Menningartilgongd

Veitarin skal eisini orða ein arbeiðssáttmála millum seg og Løgtingsumsitingina, har veitarin greitt tilskilar, hvat hann í mun til verkætlanarfrymilin og ásettu tíðarætlanina væntar, at LU skal nýta av tíð og tilfeingi til verkætlanina, so arbeiðið gongur framá sum ætlað. Avtalur um fundir, arbeiðsfundir, statusfundir og samrøður verða avtalaðar við innanhýsis

verkætlanarleiðaran, og sama er galdandi fyri fundir og annað virksemi, ið møguliga skal avtalast við aðrar veitarar hjá Løgtingsumsitingini.

#### 6.10.4. Menningarumhvørvi

Veitarin skal lýsa, hvussu nýggja loysnin gjøgnum menningartilgongdina stigvíst verður flutt yvir á umhvørvið hjá Løgtinginum. Her verður hugsað um, hvar skipanin frá byrjan verður ment, og hvussu hetta leypandi verður flutt yvir í umhvørvi hjá Løgtinginum.

#### 6.10.5. Royndarkoyring og verkseting

Veitarin skal lýsa, hvussu partar av loysnini verða royndarkoyrdir, og hvussu hon endaligt verður royndarkoyrd. Eisini skal lýsast, hvussu verksetingin verður framd.

#### 6.10.6. Undirvísing

Sum part av veitingini skal veitarin skipa fyri undirvísing fyri starvsfólkum og tryggja, at hesi hava ræðið á skipanini, tá ið hon verður yvirtikin. Starvsfólkini skipa sjálvi fyri undirvísing fyri tingmonnum.

# 7. Tilboð frá veitara

Fyri á bestan hátt at geva øllum tilboðsgevum somu treytir at lýsa teirra veiting, so hon verður mett javnbjóðis við møguligar aðrar veitarar, verður fylgjandi krav - myndil nýttur í útbjóðingini.

## 7.1. Krav til tilboðið

Veitarin skal í tilboðnum greiða frá í stuttum, hvussu tilboðið er skipað, og hvørji skjøl eru knýtt til tilboðið. Umframt at svara kravlistanum, sum verður latin á spurnafundi tann 12. november 2018, ger veitarin sjálvur av, hvussu hann annars skipar tilboðið, og hvørji hjáskjøl ella annað viðkomandi tilfar er knýtt at tilboðnum.

Tað áliggur veitaranum at upplýsa um allar kostnaðir og veitingar, sum eru partur av loysnini, og sum veitarin metir skulu til fyri at nøkta tey krøv, sum eru sett fram í kravlistanum.

Veitarin skal gera eitt ítøkiligt uppskot um, hvussu verkætlanin er skipað, og hvussu menningartilgongdin er býtt sundur í ymiskar partar og veitingar.

## 7.2. Samlað lýsing av veiting

Veitarin verður biðin um at lata inn tilboðsskjal og annað tilfar, sum á besta hátt kann lýsa, hvørja loysn veitarin bjóðar sær fram at menna og sum minstamark lýkur tey krøv, ið verða lýst í kravlistanum. Tilboðsskjalið skal innleiðandi skipast soleiðis:

- **Síða 1:** Forsíða
- **Síða 2:** Prísir og gjaldsavtala. Í hjáskjali 5 er leistur fyri prís- og gjaldsavtalu viðheftur. Hesin skal setast inn á síðu 2.
- **Síða 3:** Tíðarætlan og mílasteinar fyri verkætlanini
- **Síða 4:** Innihaldsyvirlit við síðutali, har til ber at fáa fatan av, hvussu lýsingin av loysnini er skipað

Veitarin ger sjálvur av, hvussu tilboðstilfarið annars er skipað. Svar uppá kravlista verður viðheft tilboðnum sum hjáskjal.

## 7.3. Kravlisti

Á spurnafundi tann 12. november 2018 fáa veitarar útflýggjað ein kravlista, ið ger tað lættari hjá veitarunum at svara ymiskum krøvum viðvíkjandi veitingini. Endamálið við kravlistanum er at tryggja, at lutir í tilboðnum kunnu samanberast og metast á jøvnum føti.

## 7.4. Framløgufundur

Veitarin hevur møguleika at leggja tilboðið fram á framløgufundi, sum verður avtalaður nærri partanna millum. Veitarin hevur her møguleika at nýta upp til 2 tímar at greiða frá tilboðnum og loysnini ið bjóðað verður fram at menna.

Veitarin ger sjálvur av, hvussu framløgan er skipað, og hvørjir miðlar og amboð verða nýtt til framløguna. Løgtingsumsitingin skipar fyri fundinum og ásetir stað, har fortreytirnar eru eins fyri allar veitarar.

# 8. Útboðstilgongd

Fylgjandi verður tilgongdin í sambandi við útboðið lýst.

### 8.1.1. Tíðarætlan fyri útbjóðing

Niðanfyri sæst tíðarætlan og lýsing av tilgongdini.

| Dagur | Dato | Kl. | Evni |
|---|---|---|---|
| Týsdagin | 30-10-2018 | | Útboðið almannakunngjørt á keypsportalinum |
| Fríggjadagin | 09-11-2018 | 13:00 | Skrivligir spurningar móttiknir og fráboðan um luttøku sum tilboðsgevi |
| Mánadagin | 12-11-2018 | 10:00 | Spurnafundur verður hildin og kravlisti útflýggjaður |
| Fríggjadagin | 07-12-2018 | 12:00 | Tilboð latast inn |
| Týsdagin | 11-12-2018 | Nærri avtala | Framløgufundur av tilboð og loysn |
| Mikudagin | 19-12-2018 | 12:00 | Fráboðan um avgerð |

*Talva 8.1.1-1 Tíðarætlan fyri útbjóðing*

#### 8.1.1.1. Almannakunngerð av útboði

Útboðið verður almannakunngjørt á almenna keypsportalinum https://keypsportal.fo týsdagin 30. oktober 2018. Veitarar, ið ynskja at fáa útboðstilfarið útflýggjað, kunnu senda ein teldupost til johnhardk@logting.fo.

#### 8.1.1.2. Skrivligir spurningar

Til ber hjá veitarum at seta skrivligar spurningar um loysnina og settu krøvini. Innkomnir spurningar verða svaraðir so hvørt fram til fríggjadagin 9. november kl. 13:00. Innkomnir spurningar og svør verða løgd út í www.logting.fo.

#### 8.1.1.3. Fráboðan um luttøku sum tilboðsgevi

Í seinasta lagi fríggjadagin 9. november 2018 kl. 13:00 skulu veitarar, ið hava áhuga í at lata inn tilboð, boða frá hesum. Hetta verður fráboðað við at senda ein teldupost til johnhardk@logting.fo, viðmerk: "Tilboðsgevi til umsitingarskipan Løgtingsins".

Samstundis skal veitarin boða frá, hvørji umboð luttaka vegna veitaran á spurnafundinum tann 12. november 2018. Í mesta lagi 3 fólk kunnu umboða veitaran á fundinum.

Eisini fáa allir veitarar, ið hava boðað frá luttøku sum tilboðsgevi, allar innkomnar spurningar og svar sendandi. Upplýst verður ikki, hvør hevur sett ávísa spurningin.

#### 8.1.1.4. Spurnafundur

Mánadagin 12. november 2018 verður spurnafundur fyri veitarar, ið hava boðað frá luttøku sum tilboðsgevar.

Á spurnarfundinum fáa luttakandi tilboðsgevar møguleika at spyrja nærri um útboðstilfarið og onnur viðurskifti í hesum sambandi, sum kunnu betra fatanina av, hvat loysnin skal fevna um.

#### 8.1.1.5. Innlating av tilboði

Tilboðið skal vera Løgtingsumsitingini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. desember 2018 kl. 12:00. Tilboðini skulu latast í 3 eintøkum og talgilt sum PDF – fíla á geyma ella sendast til johnhardk@logting.fo. Tilboðið verður latið Løgtingsumsitingini, Tinghúsvegur 1-3, Tórshavn. Bert tilboð, ið er verða latin inn til ásettu tíðarfreistina, verða viðgjørd.

##### 8.1.1.5.1. Framløga av tilboði

Frá týsdegi 11. desember 2018 verður skipað fyri framløgufundum millum hvønn veitara sær og Løgtingsumsitingina. Á fundinum fær veitarin møguleika at leggja teirra loysn og tilboð fram, so bæði veitari og Løgtingsumsitingin hava somu fatan av, hvat loysnin og tilboðið fevnir um.

Áðrenn framløgufundin kann Løgtingsumsitingin senda tilboðsgevanum ynski um útgreiningar ella nærri lýsingar av loysnini. Hvør framløgufundur skal í mesta lagi vara 2 tímar, og tilboðsgevin ger sjálvur av, hvussu framløgan verður skipað.

### 8.1.2. Viðgerð og meting av tilboðum

Tilboðini verða í høvuðsheitum mett út frá innkomna tilboðstilfari. Framløgan skal stuðla undir hesum og vera við til at skapa eina greiðari fatan av, hvussu viðkomandi loysn tekur seg út.

Tá allir framløgufundir eru avgreiddir, verða innkomin tilboð nærlisin og mett eftir metingarmyndli, sum niðanfyri verður útgreinað í mun til, hvussu einstøku partarnir verða vektaðir:

| Krøv | Metingargrundarlag | Vekt |
|---|---|---|
| **Prísur** | Samlaður prísur fyri alla loysnina, íroknað møguligar lisensir, viðlíkahaldsgjald og brúkarahjálp í **5 ár** frá tí degi, at loysnin er latin Løgtingsumsitingini. | **50%** |
| **Góðska - samlað** | Samlað meting av allari veitingini, býtt út á einstakar lutir, sum lýst niðanfyri: | **50%** |
| Góðska - Loysn | **Samlað loysn** (45%)<br>Gjørd verður ein heildarmeting av loysnini grundað á, hvussu veitarin kann vísa á eina loysn, ið á besta hátt líkur krøv og ynskir. | |
| Góðska - Verkætlan | **Verkætlanarleiðsla** (5%)<br>Heildarmeting av verkætlanini í mun til:<br>1) Skipan av verkætlan<br>2) Tíðarætlan<br>3) Menningarmyndil og samstarv millum veitara og Løgtingsumsitingina<br>4) Førleikum at leiða verkætlanina | |

*Talva 8.1.2-1 Metingarmyndil*

## 8.1.2.1. Vegleiðing til vektarstig

### 8.1.2.1.1. Prísur (50%)

Tilboð við lægsta prísi fyri samlaðu veitingina fær 50 vektarstig. Síðani fáa hini tilboðini ásett vektarstig soleiðis:

***Frymil:*** *Lægsti prísur / prísur hjá viðkomandi veitara x 50*

Fyri at tryggja sær móti undirprísing, hevur Løgtingsumsitingin frammanundan gjørt eina óhefta kostnaðarmeting av samlaðu veitingini og ásett ein minstaprís. Um tilboðsprísurin hjá veitara er undir minstaprísin, verður prísurin settur til minstaprís í samanberingini við aðrar veitarar. Minstiprísurin verður ikki upplýstur. Minstiprísur í døminum niðanfyri er tilvildarligur.

<u>Dømi (við tilvildarligum upphæddum og minstaprísi á 1 mió.):</u>

Veitari 1: Samlaður prísur 1.000000 kr. 1 mió./1 mió. x 50 = 50 vektarstig av 50 møguligum
Veitari 2: Samlaður prísur 1.200000 kr. 1 mió./1.2 mió. = 45,5 (avrundað) av 50 møguligum
Veitari 3: Samlaður prísur 1.500000 kr. 1 mió./1.5 mió. = 33,3 (avrundað) av 50 møguligum
Veitari 4: Samlaður prísur 850.000 kr. Minstiprísur galdandi á 1 mió. = 50 vektarstig av 50 møguligum

### 8.1.2.1.2. Góðska (45%)

Gjørd verður ein heildarmeting av, hvussu veitarin bjóðar sær til at nøkta ynskir og krøv til eina nýggja umsitingarskipan. Metingin byggir á ítøkiliga uppskotið til loysn fyri einstøku lutirnar, ið skipanin er sett saman av. Á spurnafundi tann 12.

november 2018 fáa veitarar saman við Løgtingsumsitingini møguleika fyri at viðgera, hvat serligur dentur verður lagdur á í mun til góðsku og hvørji krøv hava serligan týdning í mun til loysnina.

Stigatalið fyri góðsku og hvussu veitarin vísur á loysnir í mun til krøv verða samantald. Veitarin fær eitt samlað vektarstig fyri hetta , har tað í mesta lagi verður latið 45 stig.

#### 8.1.2.1.3. Verkætlan (5%)

Verkætlanarleiðslan verður mett við vektarstigi frá 0 til 5.

#### 8.1.2.1.4. Samlað vektarstig

Í talvuni niðanfyri sæst dømi, hvussu samlaðu vektarstigini verða funnin við samanlegging av øllum lutum:

| | **% av samlað** | **Mest stig** | **Veitari 1** | **Veitari 2** | **Veitari 3** | **Veitari 4** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Prísur** | 50% | 50 | 1000000 | 1200000 | 1500000 | 800000 |
| | | | 1 mió./1 mió. x 50 | 1 mió./1.2 mió. x 50 | 1 mió./1.5 mió. x 50 | ≈ 1 mió./1 mió. x 50 |
| Stig til veitara | | | 50 | 45,5 | 33,3 | 50 |
| **Góðska** | 45% | 45 | 30 | 38 | 42 | 20 |
| **Verkætlan** | 5% | 5 | 4 | 3 | 5 | 4 |
| **Íalt vektarstig** | | | 84 | **86,5** | 80,3 | 74 |

*Talva 8.1.2.1.5-1 Tilvildarligt dømi fyri samlaðu útrokningina av vektarstigum.*

Sambært lýsta dømi, vil veitari 2 fáa flest stig (86,5) og tí verða mettur best egnaður at lyfta verkætlanina.

### 8.1.3. Fráboðan um avgerð

Í seinasta lagi mikudagin 19. desember 2018 kl. 12:00 verður alment boðað frá á Keypsportalinum, hvat tilboð er mett at kunna veita røttu loysnina í mun til ásettu krøvini, og sum Løgtingsumsitingin tekur upp samráðingar við um víðari tilgongd.

Teir veitarar, ið Løgtingsumsitingin ikki tekur av tilboðnum frá, kunnu biðja um eina skrivliga frágreiðing um støðutakanina av teirra egna tilboði. Hetta verður gjørt við at senda ein teldupost til johnhardk@logting.fo í seinasta lagi 10 yrkadagar eftir, at fráboðanin er almannakunngjørd.

Um innkomnu tilboðini ikki eru nøktandi í mun til ásettu krøvini, ella kostnaðurin víkur munandi frá egnum kostnaðarmetingum, tilskilar Løgtingsumsitingin sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði.

### 8.1.4. Víðari tilgongd við veitara

Sáttmálasamráðingar við útvalda veitaran verða tiknar upp skjótast til ber, og fer verkætlanin í gongd skjótast til ber eftir, at sáttmáli er undirskrivaður partanna millum.

# 9. Serlig viðurskifti

## 9.1. Flytan av tilfari frá verandi umsitingarskipan (Migrering)

Í verandi umsitingarskipan liggur í dag data, sum tá tíðin er búgvin, skal flytast yvir í nýggju skipanina. Til tess at tryggja, at menningartilgongdin av nýggju loysnini ikki verður órógvað av hesum, er avgjørt, at hetta arbeiðið verður fyrireikað sum ein uppgáva fyri seg, og er tí ikki partur av útbjóðingini. Løgtingsumsitingin tekur seinni støðu til, um uppgávan verður loyst saman við veitaranum, sum hevur uppgávuna at menna nýggja skipan, ella at bjóða hetta út í mun galdandi reglur um almenna útbjóðing .

## 9.2. Menning av nýggjum markamóti til AV – skipan í tingsalinum

Í tingsalinum verður í dag nýtt ein sokallað AV – skipan, ið ambætar alla útgerð til ljóð- og sjónbandaupptøku og amboðum at stýra orðaskifti og atkvøðugreiðslum á tingi. AV – skipanin samvirkar í ávísan mun við verandi umsitingarskipan, men er hetta ikki nærri lýst í hesum skjali. Løgtingsumsitingin arbeiðir í løtuni við at gera dagføringar á hesum øki, og tí kunnu fortreytirnar í framtíðini broytast í mun til at knýta AV - skipanina til eina nýggja skipan. Uppgávan at fáa skipanirnar at samvirka, verður tí lýst seinni og væntandi loyst saman við veitara, ið mennir nýggju umsitingarskipanina. Løgtingsumsitingin vil tó eisini her taka atlit til galdandi reglur um almenna útbjóðing.